# ÚTSÝNI 2025

Ein meting av ytru treytunum fyri trygdina í Kongsríki Danmarkar, grundað á fregnir



FORSVARETS EFTERRETNINGSTJENESTE

## YVIRSKIPAÐU METINGARNAR HJÁ FREGNARTÆNASTUNI UM HÓTTANIRNAR MÓTI KONGSRÍKI DANMARKAR

**ÚTSÝNI** lýsir ytru treytirnar fyri trygd Kongsríkis Danmarkar. ÚTSÝNI er ein av fýra yvirskipaðum metingum av hóttanunum í og móti kongsríkinum. Hinar eru:

- **Meting av yvirgangshóttanini ímóti Danmark**, har Miðstøðin fyri Yvirgangsgreining (CTA) ásetur landsins yvirgangshóttanarstig og lýsir yvirgangshóttanina ímóti Danmark og donskum áhugamálum í útheiminum.

- **Meting av hóttanini um njósning ímóti Danmark, Føroyum og Grønlandi**, sum verður útgivin av PET og lýsir fregnarvirki hjá fremmandum statum ímóti Danmark, t.e. serstakliga njósning, ávirkan og royndir at útvega tøkni og vitan á ólógligan hátt.

- **Nethóttan ímóti Danmark**, har Stýrið fyri Samfelagstrygd (SAMSIK) lýsir og ásetur hóttanarstig á netnjósning, netbrotsverk, netatgerðir, oyðandi netálop og netyvirgang á tjóðina.

# FORORÐ

Góði lesari

Kongsríki Danmarkar væntar í komandi tíðum fleiri og álvarsligari hóttanir og trygdarpolitiskar avbjóðingar enn í mong ár. Hetta lýsir FE í ÚTSÝNI, sum er okkara árliga íkast til almenna kjakið um trygdarpolitikk Kongsríkis Danmarkar.

Í 2025 hevur FE givið fleiri metingar út um hóttanina úr Russlandi. Í februar skrivaðu vit um hóttanina frá russisku hernaðardubbingini, og í oktober skrivaðu vit um verandi hybridkríggj Russlands móti NATO og vesturheiminum.

Í ÚTSÝNI kunnu tit endurskoða hesar somu grundleggjandi metingarnar um Russland saman við okkara metingum um tær týdningarmestu hóttanirnar og trygdarpolitisku avbjóðingarnar uttaneftir. Tað snýr seg m.a. um herdu kappingina í Arktis millum stórveldini, tráanina hjá Kina eftir at gerast ein avgerandi leikari og hóttanina frá islamistiskum yvirgangi.

Ritstjórningin er endað hin 2. december 2025.

Góðan lestrarhug.

**Thomas Ahrenkiel**
Stjóri á Verjufregnartænastuni

# INNIHALD


03 **FORORÐ**

06 **HØVUÐSNIÐURSTØÐA**

08 **HEIMSVALDSVIÐURSKIFTI**

14 **RUSSLAND**

26 TEMA: **HYBRIDAMBOÐ**

30 **ARKTIS**

40 TEMA: **HÓTTANIN ÍMÓTI AVGERANDI UNDIRSTØÐUKERVI**

42 **KINA**

52 **YVIRGANGUR, ÓTRYGD OG FÓLKAFLYTING**

62 **ALLÝSINGAR**

**HEIMSVALDS-VIÐURSKIFTI** 08

Stórveldi raðfesta alsamt fremri egin áhugamál og nýta vald at røkka sínum málum.

**RUSSLAND** 14

Russland heldur seg stríðast við NATO og herjar á samgonguna við sabotasju og oyðileggjandi net-álopum v.m.

**TEMA: HYBRIDAMBOÐ** 26

Russland brúkar hybridamboð í síni roynd at fáa NATO-londini at vikna í sínum samanhaldi og sínum evni at taka avgerðir.

**ARKTIS** 30

Russland, Kina og USA hava ymisk áhugamál í Arktis, men tey vilja øll hava ein størri leiklut í økinum.

**TEMA: HÓTTANIN ÍMÓTI AVGERANDI UNDIRSTØÐUKERVI** 40

Ymisk lond, serstakliga Russland, umboða týðandi hóttanir ímóti avgerandi undirstøðukervi í vesturheiminum.

**KINA** 42

Kina ætlar sær at hava valdið í Asia og at tvinga eina endursameining við Taivan ígjøgnum.

**YVIRGANGUR, ÓTRYGD OG FÓLKAFLYTING** 52

Yvirgangshóttanin í Evropa fer framhaldandi at vera álvarslig. Tað er m.a. vegna framhaldandi ótrygd og stríð í Miðeystri.

# HØVUÐSNIÐURSTØÐA

Stórveldi raðfesta alsamt meira egin áhugamál og nýta vald til tess at røkka teimum. Russland heldur fram við síni innrás í Ukraina og ger hybridálop á NATO og vesturheimin. Kina nýtir sítt fíggjarliga vald og í vaksandi mun hermegi til at leggja trýst á onnur lond og stuðlar krígnum hjá Russlandi í Ukraina. Kina og Russland eru kjarnin í eini røð av londum, ið royna at skerja ávirkanina kring allan heim frá vestanlondum, serliga USA. Enntá nýtir USA nú sítt fíggjarliga og tøkniliga vald móti egnum sameindum og partnarum. Tað er óvist, hvussu viðurskiftini millum Kina og USA fara at vera komandi árini, men hesi lond verða verandi strategiskir kappingarneytar í langa tíð.

Russland metir seg at stríðast við NATO og ger hybridálop móti samgonguni, til dømis herverk og skaðilig netálop. Russiska hermegin hóttir somuleiðis leiðirnar kring Danmark. Hóast fleiri amerikanskar royndir at fáa eina friðaravtalu í lag, fer Russland sannlíkt framhaldandi í 2026 at verða bundið av krígnum í Ukraina. Russiski hernaðarídnaðurin fer framhaldandi at vera meira virkin tey komandi árini enn tann evropeiski. Samstundis er tað óvist, um USA vil átaka sær ábyrgdina av trygdini í Evropa. Hetta fer at skunda undir Russland at fremja alsamt feiri hybridálop á NATO. Tann hernaðarliga hóttanin frá Russlandi móti NATO fer at økjast, hóast eingin hóttan enn er um eitt veruligt hernaðarálop á Kongsríki Danmarkar. Somuleiðis njósnast Russland mótvegis kongsríkinum við nógvum endamálum, ikki minst á netinum. Eitt endamál er at vinna sær fyrimun, um kríggj skuldi brostið á við NATO.

Russland, Kina og USA hava ymisk áhugamál í Arktis, men øll tráa eftir øktum leikluti har. Trygdarpolitiski áhugin hjá USA fyri Arktis er øktur munandi tey seinastu árini, Russland heldur á við síni dubbing, og Kina arbeiðir støðugt fram ímóti at kunna sigla á og undir sjónum har á leiðini. Russland hevur enn ta sterkastu hermegina í Arktis, men kennir sína støðu hótta av vesturheiminum. Russland fer tí í alsamt størri mun at verja síni áhugamál við hóttandi politiskum og hernaðarligum atburði. Russland er kroyst av vesturlendskum revsitiltøkum v.m. og fer tí at økja sítt samstarv við Kina og geva Kina størri atgongd til sínar arktisku leiðir.

Kina tráar m.a. eftir eini leiðandi støðu í Asia og at noyða eina endursameining við Taivan ígjøgnum. Í báðum førum krevst ein styrkt støða serliga mótvegis USA. Tí dubbar Kina seg og styrkir samvinnuna við Russland og viðurskiftini við onnur lond uttan fyri vesturheimin. Samstundis virkar Kina fyri at gera sína fíggjarligu og tøkniligu menning óhefta at londum í vesturheiminum. Kina hevur eina sera umfatandi ætlan fyri netnjósning fyri m.a. at styrkja sína tøkniligu menning. Sum heild frireikar Kina seg til eitt hert stríð við vesturheimin.

Yvirgangshóttanin fer framhaldandi at vera álvarsom í Evropa m.a. vegna áhaldandi ótryggleika og ósemjur í Miðeystri. Tey seinastu árini er talið á islamskum yvirgangsálopum vaksið í Evropa, serstakliga tí at valdsbólkar misnýta stríðið í Gasa til at eggja hernaðarligum islamistum til at leypa á. Samstundis ger tann ótrygga støðan í Sýria, at Islamskur Statur styrknar og gerst aftur ein álvarslig hóttan móti Evropa. Í Jemen hóttir Houthi-rørslan framhaldandi skipaferðsluna í Reyðahav, væl stuðlað av Iran. Sum part av stríðnum við Ísrael fremur Iran yvirgang móti ísraelum og jødum uttan fyri Ísrael.



# HEIMSVALDS-VIÐURSKIFTI

## STERK LOND ROYNA Í STØRRI OG STØRRI MUN AT NOYÐA SÍN VILJA INN Á ONNUR BÆÐI VIÐ FÍGGJARLIGARI OG HERNAÐARLIGARI MEGI



Stórveldi raðfesta alsamt meira egin áhugamál og nýta vald til tess at røkka teimum. Russland heldur fram við síni innrás í Ukraina og ger hybridálop á Nato og vesturheimin. Kina nýtir sítt fíggjarliga vald og í vaksandi mun hermegi til at leggja trýst á onnur lond og stuðlar krígnum hjá Russlandi í Ukraina. Kina og Russland eru kjarnin í eini røð av londum, ið royna at skerja ávirkanina kring allan heim frá vestanlondum, serliga USA. Enntá nýtir USA nú sítt fíggjarliga og tøkniliga vald móti egnum sameindum og partnarum. Tað er óvist, hvussu viðurskiftini millum Kina og USA fara at verða komandi árini, men hesi lond verða verandi strategiskir kappingarneytar í langa tíð.

**Russiski forsetin Vladimir Putin og kinverski forsetin Xi Jinping undir eini hersýning í Moskva í mai 2025.**
**Novozhenina/Reuters/Ritzau Scanpix**

Valdsjavnvágin í heiminum er broytt. Ávirkanin frá Kina er vaksin munandi tey seinnu árini, og tað hevur fingið leiklutin hjá USA sum leiðandi veldi í heiminum at minka. Kina og USA kappast um ávirkan, samgongur og tilfeingi, og tí kann hvørki teirra einsamalt stýra gongdini.

Tað er nú veruliga gjørligt hjá eini røð av londum uttan fyri vesturheimin at avtala samstørv við Kina heldur enn USA. Kina og Russland royna í felag við samsintum londum at tálma altjóða ávirkanina frá vesturheiminum, serliga USA, og samstundis er ivi sáddur um raðfestingarnar hjá USA. Ymisk økisveldi fáa við hesum víðkaðar ræsur til at velja millum USA og Kina ella eitt sindur av hvørjum.

Sterk lond royna meir og meir at noyða sín vilja inn á onnur, bæði við fíggjarligari og hernaðarligari megi, og tað ávirkar álit og samstarv millum heimsins lond. Við stuðli frá londum sum Kina heldur Russland fram við síni innrás av Ukraina á fjórða ári og førir nú eisini hybridkríggj við vestanlond. Kina nýtir í størsta mun fíggjarligt vald, men eisini hernaðarliga hóttan og hybridkynstur mótvegis øðrum londum. Sambandið millum Russland og Kina er tættari enn nakrantíð hóast misjavnan, við tað at Kina er nógv tann sterkari parturin.

Samstundis fyrireikar Kina seg til møguligt kríggj við USA í Kyrrahavinum. Bæði Russland og Kina eru sostatt í ferð við at herbúgva seg. Tað leggur trýst á vesturheimin at styrkja sítt hernaðarvald. Um tað ikki eydnast, kann vesturheimurin í ringasta føri um fá ár vera í einari støðu, har ið Russland og Kina eru klár at fara í kríggj ávikavist í Eystursjónum og Taivansundinum.

### USA setir skránna

Hægsta strategiska raðfestingin hjá USA er nú kappingin við Kina og trygdin í egnum nærumhvørvi, men USA hevur ikki enn funnið ta samlaðu javnvágina í sínum raðfestingum. Týðiligasta broytingin í 2025 er, at trygdin í egnum nærumhvørvi verður nú raðfest munandi hægri enn áður. Henda raðfesting snýr seg partvíst um at tálma ávirkanina frá Kina á londini kring USA. USA nýtir fíggjarligt vald, sum til dømis hóttanir um høgan toll, fyri at fáa sín vilja og hóttir nú eisini við hermegi sjálvt mótvegis egnum sameindum londum.

Við síni støðu og ávirkan í heiminum er Kina í dag einasta land, sum sjálvt kann bjóða USA av, og USA er farið at tillaga sín uttanríkis- og trygdarpolitikk munandi til tess at møta hesi avbjóðing.

Tað er ikki nýtt, at USA vil nýta fleiri kreftir upp á kappingina við Kina, men Kina er nú so sterkt, at USA er farið undir at styrkja sítt fíggjarliga og politiska mótspæl munandi mótvegis Kina. Stór óvissa er um, hvussu viðurskiftini millum USA og Kina fara at verða tey komandi árini, men strategiska kappingin millum hesi bæði stórveldini fer at halda fram í langa tíð.

USA og Kina kappast um at menna nýmótans vápnaskipanir og um at vera á odda á tøkniligum økjum, sum kunnu hava hernaðarlig endamál, t.d. vitlíki. Samstundis eru londini, serstakliga Kina, í ferð við herdubbing, sum skal gera tey før fyri møguliga at kríggjast ímóti hvørjum øðrum, hóast hvørki teirra vil tað.

Valdsjavnvágin í kyrrahavsøkinum flytur seg til fyrimun fyri Kina, og tí vil USA flyta hernaðarmegi til økið. At USA alt meiri leggur høvuðsdentin á Kyrrahavið, elvir samstundis til óvissu um landsins leiklut sum tann týdningarmesti trygdarverjin í Evropa. Tað er ikki minst galdandi í mun til hóttanina úr Russlandi. Tann broytti politikkurin hjá USA setir stór krøv til dubbing og samstarv millum lond í Evropa um í alsamt størri mun at ræða Russland.

### Misálit rúgvar alsamt meira upp í viðurskiftunum millum statir

At USA, Kina og Russland nýta vald hevur hvørt á sín hátt elvt til vaksandi misálit millum statir, eisini millum hevdbundnar partnarar og sameind.

Statir eru t.d. vorðnir meira ansnir viðvíkjandi veitingarketum og viðvíkjandi hvørjum londum, teir eru bundnir at, tá ið tað snýr seg um serliga týdningarmikil mál sum ráevni, orku, tøkni og matvørur. Fleiri statir avmarka til dømis síni samstørv innan gransking og íløgur tvørtur um landamørk umframt deiling av hernaðartøkni.

## KINA HEVUR RÆÐI Á HEIMSVEITINGUM AV RÁRUM JARÐSLØGUM

Í 2024 átti Kina uml. 70% av øllum heimsins ráru jarðsløgum. Landið ræður yvir nógv tí størsta førleikanum á viðgerðarstignum, har jarðsløgini verða sáldað og reinskað, tá ið tey eru fingin úr jørðini. Kina ræður harumframt yvir størstu goymslunum av rárum jarðsløgum, og Kina hevur eisini samstarvsavtalur um at virka rár jarðsløg í fleiri øðrum londum. Samanlagt gevur tað Kina eina alráðandi støðu á heimsmarknaðinum, bæði tá ið tað snýr seg um grevstur og virking.

Rár jarðsløg eru 17 skyld grundevni, sum eru avgerandi í øllum frá snildfonum og elbilum til stýrd missil og fylgisveinar. Ofta verða jarðsløgini býtt í tveir bólkar eftir eginleikum og vekt: løtt og tung. Hóast heitið er rár jarðsløg, eru tey lutfalsliga nógvastaðni á jarðarskorpuni. Serliga tey løttu sløgini. Avbjóðingin er at finna tey í nóg stórum nøgdum og ikki minni at grava og virka tey á ein hátt, ið er fíggjarliga og umhvørvisliga ráðiligur.

Summi av teimum tungu jarðsløgunum hava serliga góðar eginleikar, tí tey verða brúkt t.d. í magnetum, sum eru so týðandi í ymsum vápnaskipanum. Hesi tungu jarðsløgini eru nógv savnað í Kina og Myanmar.

Grevstur og virking av rárum jarðsløgum er vorðið eitt av týdningarmestu snúningsdeplunum í kappingini millum Kina og USA. Seinnu árini hevur Kina átt um leið 70% av amerikanska innflutninginum av rárum jarðsløgum og er sannlíkt enn nógv tann størsti veitari til USA. Evropa er eisini ógviliga nógv heft av Kina, hvat ávísum jarðsløgum viðvíkur. Kina hevur hert reglurnar um útflutning av rárum jarðsløgum. Tað kann raka bæði verjuídnaðin og sivilan ídnað bæði í USA og Evropa.




Heimild: U.S. Geological Survey, Mineral Commodity Summaries. 1995-2025

## ØKISSTÓRVELDI HAVA EISINI ÁVIRKAN Í EINUM HEIMI, SUM ER MERKTUR AV STÓRVELDUM

Økisstórveldi kroysta eisini egin áhugamál ígjøgnum í sínum nærumhvørvi. Hesir statir kunnu fáa betri rásarúm, um USA og Kina í sínámillum kapping flyta sín áhuga til onnur øki.




**1 ES**
Evropasamveldið er vegna sína fíggjarligu styrki ein týdningarmikil altjóða leikari. Trygdarpolitiska støðan tey seinnu árini hevur fingið londini í Evropa at leggja meira dent á dubbing.

**2 Russland**
Landið hevur serliga ávirkan vegna sína stóru atomvápnagoymslu og vilja til at nýta vald ímóti grannalondum.

**3 Ísrael**
Hóast landið er lítið, hevur Ísrael síðani yvirgangsatsóknina 7. oktober 2023 víst seg at vera tað alráðandi hernaðarliga valdið í Miðeystri. Millum annað hevur Ísrael við hernaðarálopum skert ávirkanina frá Iran munandi í økinum.

**4 India**
Landið er tað fólkaríkasta í heiminum. Har fer ein týðandi fíggjarlig menning fram í løtuni, og landið hevur møguleika at gerast eitt ráðandi økisstórveldi. Samstundis gera tey broyttu valdsviðurskiftini í heiminum, at India vendir sær bæði vestureftir og ímóti Kina og Russlandi.

**5 Japan**
Hernaðarliga eins væl og fíggjarliga er Japan ein avgerandi statur í vestara parti av Kyrrahavinum. Við sínum nýmótans hervaldi og amerikanskum hernaðarstøðum og -deildum í landinum hevur Japan stóran týdning, um kríggj skuldi brostið á har umvegir. Samstundis hevur Japan ein virknan leiklut í samráðingum um fíggjarligar avtalur í økinum.

**6 Brasilia**
Landið er tað størsta og fólkaríkasta í Suðuramerika við stórari fíggjarligari og politiskari ávirkan, m.a. í samstarvsfelagsskapum har á leið. Brasilia hevur eisini virknan leiklut í altjóða høpi, m.a. gjøgnum ST og BRIKS-samstarvið. Brasilia, sum áður horvdi dyggiliga ímóti USA, samstarvar nú eisini við Kina og vendir sær somuleiðis móti Evropa.

**Kina og Russland hava sum felags mál at minka ávirkan vesturheimsins**
Samstarvið millum Russland og Kina gerst alsamt tættari, og tey eru týdningarmestu partnarar hvør hjá øðrum. Hetta er soleiðis, hóast samstarvið teirra millum enn er merkt av misáliti, tí at tey hava mótsett fíggjarlig og politisk áhugamál, m.a. í Miðasia og Arktis.

Kina og Russland arbeiða saman ímóti einum máli, sum er at minka alheims ávirkanina frá vesturheiminum, herundir serliga USA, og sjálvi gerast tey máttmiklu londini. Kina og Russland samskipa sínar áskoðanir í ST-trygdarráðnum og styrkja altjóða stovnar, har tey bæði hava stýrandi leiklutir. Tað er t.d. galdandi fyri BRIKS, sum er eitt samstarv millum Brasilia, Russland, India, Kina og Suðurafrika og nøkur onnur lond uttan fyri vesturheimin, og Shanghai Cooperation Organisation (SCO), sum er eitt samstarv millum Kina, Russland og m.a. tey miðasiatisku londini.

Russland hevur størri tørv á Kina enn øvut, serstakliga á fíggjarliga økinum. Hesin tørvur er vaksin, síðani kríggið í Ukraina byrjaði. Kina er týdningarmesti handilspartnari hjá Russlandi og størsti keypari av russiskari orku. Umleið helvtin av Russlands innflutningi kemur nú úr Kina, men undan krígnum var tað bara uml. ein fjórðingur. Hinvegin fara bara uml. 4% av øllum útflutninginum hjá Kina til Russlands.

Russland virkar fyri at gera fíggjarliga samstarvið við Kina enn tættari, men tað er mark fyri, hvussu langt Kina vil fara. Kina vil sleppa undan revsitiltøkum frá vesturheiminum og vil ikki vera ov bundið at einstøkum landi til at nøkta sín fíggjar- ella orkutørv.

Stuðulin frá Kina til kríggið hjá Russlandi í Ukraina er avgerandi fyri, at Russland kann halda fram at kríggjast. Vørur, fevndar av revsitiltøkum, sum Russland brúkar í krígnum í Ukraina, eru mest sum allar úr Kina. Tann diplomatiski stuðulin er eisini týdningarmikil, til tess at Russland fær savnað breiðan stuðul í síni almennu mótstøðu móti vesturheiminum.

Kríggið í Ukraina og hóttanin úr Russlandi hevur vakt ans hjá USA og evropiskum londum. Tað hevur førkað serstakliga amerikanskan ans frá hóttanini úr Kina. Tessvegna vil Kina hava, at ósemjan millum Russland og vesturheimin heldur fram.

Stuðulin frá Kina til kríggið hjá Russlandi í Ukraina er avgerandi fyri, at Russland kann halda fram at kríggjast.

Hernaðarsamstarvið millum Russland og Kina fer at halda fram, tá ið kríggið í Ukraina endar. Russland letur alla tíðina Kina hernaðarligar upplýsingar frá krígnum í Ukraina. Tað er m.a. galdandi fyri royndirnar at berjast ímóti vesturlendskari útgerð.

Somuleiðis menna Russland og Kina felags hernaðartøkni, og hetta samstarv er virkið bæði á sivilum og hernaðarligum útbúgvingarstovnum. Kinesisk virki og russisk universitet eru t.d. farin at samstarva um útbúgving og venjing í dronu- og flúgvitøkni. Hetta samstarv er vorðið serstakliga umráðandi, eftir at kríggið í Ukraina hevur víst tann stóra týdningin, ið dronur hava í nýmótans kríggi.

Tað hernaðarstrategiska samstarvið millum Kina og Russland fer at fáa bæði londini til betur at skilja, hvussu tey skulu verja seg ímóti hernaðartøkni og -læru vestaneftir. Tað merkir, at londini fara at standa sterkari í møguligum ósemjum við vesturheimin í framtíðini.



# RUSSLAND

## RUSSLAND FØRIR HYBRIDKRÍGGJ MÓTI VESTANLONDUM



Russland metir seg at stríðast við NATO og ger hybrid álop móti samgonguni, til dømis herverk og skaðilig netálop. Russiska hermegin hóttir somuleiðis leiðirnar kring Danmark. Hóast fleiri amerikanskar royndir at fáa eina friðaravtalu í lag, fer Russland sannlíkt framhaldandi í 2026 at verða bundið av krígnum í Ukraina. Russiski hernaðarídnaðurin fer framhaldandi at vera meira virkin tey komandi árini enn tann evropeiski. Samstundis er tað óvist, um USA vil átaka sær ábyrgdina av trygdini í Evropa. Hetta fer at skunda undir Russland at fremja alsamt feiri hybridálop á NATO. Tann hernaðarliga hóttanin frá Russlandi móti NATO fer at økjast, hóast eingin hóttan enn er um eitt veruligt hernaðarálop á Kongsríki Danmarkar.

**Russiskur hermaður skjýtur við tungum skotvápni undir einum álopi í Ukraina í oktober 2025.**
**Imago/Ritzau Scanpix**

Russland hevur kós ímóti samanbresti við vesturheimin. Beinleiðis orsøkin er kríggið í Ukraina, men mótsetningarnir hava grundleggjandi røtur í, at Putin-stjórnin vil hava Russland at verða eitt ráðandi stórveldi ájavnt við USA og Kina, men heldur NATO, ES og USA forða fyri hesum. Stjórnin heldur eina fortreyt fyri, at Russland gerst stórveldi, vera, at Russland hevur umfatandi eftirlit við fyrrverandi sovjettiskum øki, serstakliga Ukraina, Hvítarussland, Moldova og Georgia.

## Russland setir umfatandi treytir við fyri at steðga krígnum í Ukraina

Kríggið í Ukraina fer ivaleyst at halda fram eftir 2025, hóast fleiri royndir seinasta árið at finna ein enda á tí við samráðingum. Russland sigur seg alment at vilja samráðast, men heldur fram við at seta sera umfatandi krøv til Ukraina og NATO. Hóast royndir frá amerikanskari síðu at samráðast um at enda kríggið, eru eingi tekin um, at Russland er til reiðar at gera veruligar semjur fyri at fáa vápnahvíld ella friðaravtalu. Putin-stjórnin er enn sannførd um, at hon klárar seg væl í krígnum í Ukraina, og at Russland við tíðini fer at røkka sínum málum, tí at tað er meira úthaldandi enn Ukraina og vestanlondini. Tað er sera trúligt, at Russland ikki gongur við til eina vápnahvíld ella friðaravtalu, fyrr enn landið fær meginpartin av sínum krøvum uppfylgt, ella prísurin fyri at halda fram verður størri enn fyrimunurin.

Russland hevur higartil fyrst og fremst brúkt samráðingar við USA um kríggið í Ukraina til at endurskapa samrøðu millum tey bæði londini. Russland vil serstakliga útseta nýggj revsitiltøk frá USA og um til ber enda ella linka núverandi revsitiltøk. Sjálvt um tey bæði londini bøta síni viðurskifti, fer tað ikki at broyta Russlands grundleggjandi misálit á USA. Russland heldur ikki, at samráðingar við USA kunnu elva til varandi vinning, sum er meira verdur enn at halda fram við krígnum í Ukraina. Russland fer tó at tránýta tað amerikanska ynski um ein skjótan enda á krígnum til at sáa split millum USA og Evropa.

Um Russland fær betri viðurskifti við USA, kann tað fáa stóra ávirkan á teirra samstarv við onnur lond. Stúran fyri fleiri amerikanskum revsitiltøkum hevur higartil gjørt handilin við nógv lond truplari og fingið útlendsk virki at vera varin við at handla við Russland. Um tað broytist, verður tað betri bæði fyri almennu fíggjarstøðuna í Russlandi og lættari hjá Russlandi at fáa atgongd til teir lutir, sum landið brúkar í hernaðardubbingini. Sostatt verður tað eisini lættari hjá Russlandi at varðveita krígstrýstið á Ukraina.

## Russland vinnur land í Ukraina, men er ikki nær einum hernaðarligum sigri

Tað er trúligt, at hvørki Russland ella Ukraina fer at vinna seg munandi fram á hermótunum í 2026. Russland fer enn at hava betri fortreytir fyri at føra pøsingarkríggj enn Ukraina. Tað er av tí, at Russland alla tíðina útvegar sær fleiri hermenn og hevur størri hernaðarframleiðslu enn Ukraina. Verjustríðið hjá Ukraina hevur síðan 2022 forðað Russlandi at hertaka tey heilt stóru landaøkini, og Russland hevur í 2025 bert klárað at tikið uml. 1% av samlaða økinum í Ukraina. Vandin fyri einum knappligum frambroti er tó vaksandi sohvørt, sum tann ukrainsku hermegin maktast.

Russland hevur vaksið munandi um talið á álopum við langtberandi vápnum í 2025, samstundis sum landið framleiðir meira av serliga dronum og missilum. Talið á russiskum álopum fer ivaleyst at vaksa enn meira í 2026. Russland roynir við sínum álopum serliga at raka hernaðarídnaðin í Ukraina. Álopini gera tað torførari hjá Ukraina at venda gongdini á hermótinum, men tað er ikki væntandi, at loftálopini í sær sjálvum verða nóg mikið til at avgera kríggið til fyrimun fyri Russland.

Ukraina ger eisini alt fleiri og størri loftálop ímóti serligum hernaðarmálum og orkuverkum í Russlandi. Álopini hava m.a. fingið bensinprísirnar at hækka vegna nógvar skaðar á russisk oljureinsiverk. Ukraina fer óivað at fáa økt síni álop ímóti málum langt inni í Russlandi við at brúka ballistiskar missil og krússaramissil, sum Ukraina sjálvt hevur framleitt. Um Ukraina verður ført fyri at framleiða nóg mikið av missilum til at økja langtberandi álop ímóti Russlandi, verður tað nógv dýrari hjá Russlandi at halda fram við krígnum.

Møguleikarnir hjá Ukraina at verja seg, halda fram við krígnum og framhaldandi økja sína egnu framleiðslu av útgerð veldst tó við sama lag um stuðul vestanífrá. Í 2025 hevur USA ikki samtykt nýggjar stuðulsjáttanir til Ukraina, men letur enn hernaðarstuðul við fregnartænastu og loyvir londum í Evropa at keypa amerikansk vápn til Ukraina. Um eftirverandi stuðulin fellur burtur, kann tað ávirka førleikan hjá Ukraina at halda fram at kríggjast, um ikki Evropa kann taka yvir.

## ALMANNAKUNNGJØRDA METINGIN HJÁ VERJUFREGNARTÆNASTUNI (FE) AV HÓTTANINI ÚR RUSSLANDI ÍMÓTI KONGSRÍKI DANMARKAR ER ENN GALDANDI

Í metingini frá 9. februar 2025 sæst, at hernaðarliga hóttanin úr Russlandi ímóti Kongsríki Danmarkar fer at økjast tey komandi árini, hóast tað í løtuni ikki er nøkur hóttan her um eitt beinleiðis hernaðarligt álop.

Russland fyrireikar seg til kríggj ímóti NATO. Tað merkir ikki, at avgerð er tikin um at byrja eitt slíkt kríggj, men Russland dubbar og byggir sína styrki til tess at kunna taka ta avgerðina. Russland vil í løtuni við sama lag skáka sær undan at gera nakað, sum kann fáa NATO at seta grein 5 í gongd um felags verjuskyldu í samgonguni. Hóttanin um eitt beinleiðis álop úr Russlandi ímóti NATO og harvið Kongsríki Danmarkar veldst um tríggjar fortreytir:

1. at kríggið í Ukraina endar ella frystir fast.
2. at Russland uppfatar NATO sum hernaðarliga viknað ella politiskt syndrað. Tað er serliga galdandi, um Russland metir, at USA ikki kann ella vil stuðla evropisku nato-londini í kríggi ímóti Russlandi.
3. at vanliga hernaðarliga styrkin hjá Russlandi veksur, og vesturheimurin ikki byggir sína hernaðarstyrki samstundis í sama mun.



## RUSSLAND HEVUR SUM EITT AV SÍNUM MÁLUM AT FÁA RÆÐI Á STÓRUM PARTI AV UKRAINA

Kortið vísir, hvar hermótið er í novembur 2025, og teir fýra ukrainsku landslutirnar og Krim hálvoynna, sum Russland longu hevur innlimað. Russisku krígsmálini nýtast ikki at verða avmarkað til hesi øki. Russisk talsfólk tosa javnan um møguleikan, at Russland eisini innlimar landspartarnar Mikolayiv og Odesa í Útsynningsukraina.




### HVAT KREVUR RUSSLAND

Russland setur eina røð av krøvum fyri at gera semju um vápnahvíld ella friðaravtalu, m.a. hesi:

- Tey fýra lutvíst hersettu økini í Ukraina: Kherson, Donetsk, Luhansk og Zaporizhia, eins og Krim, skulu viðurkennast sum russiskt øki.
- Ukraina skal vera uttanveltað land og má ikki gerast limur í NATO.
- Ukraina skal avvápnast, og allur stuðul vestaneftir við útgerð og fregnartænastu skal halda uppat.
- NATO skal veita trygd fyri, at samgongan ikki tekur upp nýggj limalond í Eysturevropa, og at revsiatgerðirnar ímóti Russlandi verða beindar av vegnum.

Stuðulin til Russlands í krígnum í Ukraina frá serstakliga Kina, men eisini Norðurkorea og Iran, fer framhaldandi at vera avgerandi fyri møguleikan hjá Russlandi at varðveita hernaðarliga trýstið á Ukraina. Higartil hevur Kina latið týdningarmiklar lutir til vápn, men eisini dronur v.m. Harafturat hevur Kina síðani 2022 verið størsti keypari av russiskari olju og hjálpt Russlandi at skáka sær undan revsitiltøkum hjá vestanveldum.

Iran og Norðurkorea hava stuðlað Russlandi við m.a. stórum nøgdum av lóðri til skotvápn, álopsdronum og ballistiskum missilum. Eisini sendir Norðurkorea hermenn til kríggið og arbeiðarar til russiska hernaðarídnaðin. Norðurkorea fer at halda fram við at stuðla Russlandi við útgerð komandi árini. Harafturímóti eru møguleikarnir hjá Iran at halda fram við at senda Russlandi fleiri missil kanska avmarkaðir, eftir at Ísrael leyp á Iran í juni 2025.

Umframt Kina innflyta India og Turkaland stórar nøgdir av olju og oljuúrdráttum úr Russlandi. Tað er við til at fíggja Russlands útreiðslur til kríggið í Ukraina, hóast Russland noyðist at selja sína olju við munandi avsláttri.

### Russland dubbar seg mótvegis NATO, men kríggið í Ukraina heftir russiskt tilfeingi

Russland hevur sum endamál, at landsins vanliga hermegi við stuttari ávaring skal kunna vinna eitt kríggj ímóti NATO á russiska markamótinum vestanfyri og skal kunna setast inn ímóti hernaðarliga veikari grannalondum.

Russland hevur framt ta størstu endurnýgging av landsins vápnaðu deildum síðani 2008 til tess at vera betur skipað í kríggi ímóti NATO á evropiska meginlandinum. Russland hevur, síðani kríggið í Ukraina byrjaði, økt talið av hermonnum frá uml. 1 mió. til upp ímóti 1,5 mió.

Tann russiski hernaðarídnaðurin hevur síðani 2024 verið førur fyri at framleiða meira útgerð og lóður, enn landið brúkar í krígnum í Ukraina. Kríggið er tó sera krevjandi og seinkar hernaðarligu dubbingini av landinum. Tá ið kríggið endar ella frystir fast, fer Russland at fáa brúkt nógv tilfeingi til dubbing í staðin fyri til kríggj. Harafturat verður enn meira orka leys til uppdubbing, um revsitiltøkini ímóti Russlandi verða linkað.

Í løtuni framleiðir russiski hernaðarídnaðurin meira útgerð og lóður enn tann evropiski. Tað er av tí, at Russland fór at økja hernaðarídnaðin í 2022, og evropiska økingin kom í gongd nógv seinni. Um kríggið endar í 2026, fer Russland at halda fram at framleiða við somu ferð. Russland verður sostatt uppaftur sterkari enn Evropa komandi árini, um evropisk lond ikki megna at halda lyftini um íløgur í verju og veita veruliga stríðsmegi líka skjótt sum Russland.

Serstakliga síðani innrásina í Ukraina hevur Russland arbeitt við at dubba sína hermegi. Landið hevur raðfest bygging av verksmiðjum, sum framleiða stutt- og langtberandi dronur, krússaramissil og ballistiskar missil. Sostatt er Russland nú ført fyri at framleiða nógv fleiri tílík vápn enn undan krígnum við Ukraina.

Hóast russiski hernaðarídnaðurin framleiðir á høgum stigi, hevur hann nakrar trupulleikar, sum avmarka vøksturin av framleiðsluni. M.a. vantar honum arbeiðskraft, og hann skyldar nógv. Skuldin ger ídnaðin fíggjarliga veikari og avmarkar møguleikarnar at gera íløgur í nýggja framleiðslu og menning.

Tað er lítið sannlíkt, at hesar avbjóðingar fyribils fara at forða Russlandi í at halda fram at dubba tey komandi eitt ella tvey árini. Tað er serliga tí at landið fer at leggja nógv fyri til tess at stuðla hernaðarídnaðinum í at halda á við framleiðsluni. Tað fer tó samstundis at vera torført hjá Russlandi at økja hernaðarframleiðsluna munandi upp um tað stig, sum framleiðslan hevur rokkið í 2025.

### Russland førir hybridkríggj ímóti NATO og vesturheiminum

Russland fer at gera fleiri hybridálop á NATO tey komandi árini, tí at landið sær tað sum munadyggasta mátan at bjóða av og gera NATO veikari.

Russland roynir við hybridálopum alla tíðina at flyta markið fyri, hvat ið kann seta grein 5 hjá NATO í verk um felags verjuskyldu. Russland hevur m.a. gjørt fleiri sabotasjuálop og lemjandi netálop, sum hava oyðilagt dátur og skipanir í vestanlondum. Harafturat er russiska hernaðarliga atferðin nærindis Danmark í Eystursjónum blivin meiri avbjóðandi.

Tað var ivaleyst ein tilætlað roynd at arga, tá ið Russland á heysti í 2025 gjørdi seg inn á pólskt loftrúm við stórum tali av álopsdronum. Russland royndi ivaleyst at vita, hvussu NATO svarar tílíkum, og skapa óvissu um, hvussu langt landið er sinnað at strekkja seg uttan at fara um markið til kríggj.

Russland hevði verið meira hugað fyri harðligari hernaðarligari atferð ímóti evropiskum limalondum í NATO, um USA hevði alment sátt iva, um tað fer at svara aftur upp á russiskt álop á eitt tílíkt NATO-limaland. Russland fer at kunna arga á henda hátt til tess at royna, um USA veruliga fer at hjálpa Evropa. Harafturat verður Russland ivaleyst meira hugað at hótta NATO-lond í Evropa, um USA savnar seg meira um kyrrahavsøkið og flytur fleiri av sínum hermonnum úr Evropa.

## RUSSISKA DRONUFRAMLEIÐSLAN ER VAKSIN MUNANDI SÍÐAN 2022

| | Stutt berandi dronur (Undir 50 km) | Langt berandi dronur (Yvir 50 km) |
|---|---|---|
| 2022 | Minst 100 | Minst 500 |
| 2023 | Minst 50.000 | Minst 5.000 |
| 2024 | Minst 1.500.000 | Minst 15.000 |
| 2025 | Minst 2.000.000 | Minst 35.000 |

## Russland njósnast fyri at standa sterkari mótvegis NATO

Teldusníkar og umboðsmenn í Russlandi hava í áratíggju njósnast ímóti Kongsríki Danmarkar til tess at styðja upp undir russisk trygdarpolitisk áhugamál. Ein partur av hesari njósning vendir sær ímóti vitan, sum kann veita Russlandi fyrimun í møguligum kríggi við NATO. Russland hevur brúk fyri vitan um verju- og tilbúgvingarætlanir, útgerð, uppdubbing, samanhald o.a.m. til tess at fyrireika sínar egnu hernaðarætlanir.

Russiskir teldusníkar og umboðsmenn royna m.a. at stjala hesa vitan frá NATO og verju- og uttanríkisráðum í limalondunum. Teir royna eisini at stjala vitan frá virkjum, sum arbeiða við verjutøkni. Hesa vitan kann Russland lata sínum egna hernaðarídnaði og brúka til at menna sína egnu útgerð. At vita um hernaðarútgerð og tøkniliga styrki og veikleika í NATO kann eisini geva Russlandi hernaðarligan fyrimun.

Russland hevur eisini framhaldandi roynt at bróta inn í telduskipanir hjá donskum og vesturlendskum myndugleikum og flutnings- og orkufyritøkum. Í tí sambandi hevur eitt av endamálunum ivaleyst verið at fáa atgongd og upplýsingar, sum Russland fær nýtt til at órógva ella sløkkja avgerandi undirstøðukervi vestanfyri einaferð seinni. Tað kann verða gjørt við oyðileggjandi netálopum ella sabotasju. Russland kann velja at gera slík álop beint undan ella undir einum kríggi við NATO fyri t.d. at leggja trýst á samfelagið í NATO-londum ella órógva møguleikan hjá samgonguni at senda hermenn og útgerð til hermótið, t.d. gjøgnum Danmark.

## Russland dubbar seg eisini kring Eystrasalt

Økið, har ið størst vandi er fyri, at Russland fer at brúka hermegi móti NATO, er í og kring Eystrasalt, og har er samstundis tann størsti vandin fyri, at Danmark verður beinleiðis blandað upp í kríggj við Russland.

Stóri áhugin hjá Russlandi her á leiðini stendst ikki minst av, at økið hevur stóran trygdarpolitiskan eins væl og fíggjarligan týdning fyri Russland. Her hevur landið fleiri týdningarmiklar havnir, sum verða nýttar til útflutning av olju og gassi. Umleið helvtin av oljuútflutninginum hjá Russlandi við skipi fer um Eystrasalt og tey donsku sundini. Harafturat er Eystrasalt avgerandi fyri atkomuna hjá Russlandi til leiðina kring Kaliningrad, sum liggur avskorið frá meginpartinum av Russlandi.

Russland hevur ætlanir um at økja sína hernaðarstyrki í og kring Eystrasalt tey komandi árini. Kríggið í Ukraina er ein avbjóðing og seinking í hesum ætlanum, tí at tað heftir landið hernaðarliga og fíggjarliga. Russland hevur tó longu stovnað nýggjar hernaðardeildir fram við markinum ímóti Finnlandi, aftanvert tey trý baltisku londini og aðrastaðni móti vestri í Russlandi.

Russland fer ivaleyst eisini tey komandi árini at staðseta fleiri nýmótans stríðsflogfør kring Eystrasalt. Samstundis styrkir Russland sín flota í Eystrasalti við nýggjum skipum, sum kunnu senda langtberandi missil eftir málum í øllum Evropa. Eystrasaltsflotin mennir eisini og venur við dronum, sum Russland fær brúkt ímóti størri herflotum hjá NATO í Eystrasalti og í donsku sundunum. Ætlanirnar hjá Russlandi merkja tilsamans, at tá ið kríggið er liðugt, verða tað munandi fleiri hermenn og meiri hernaðarligt virksemi í økinum samanborið við 2022.

Økið, har ið størst vandi er fyri, at Russland fer at brúka hermegi móti NATO, er í og kring Eystrasalt, og har er samstundis tann størsti vandin fyri, at Danmark verður beinleiðis blandað upp í kríggj við Russland.

### Russiska atferðin kring Eystrasalt fær hernaðarspenningin at vaksa

Trygdarpolitiska støðan kring Eystrasalt gerst alsamt spentari. Russland er hugað fyri ágangandi at nýta hernaðarskip og flogfør móti NATO-londum í økinum fyri at ræða tey frá at taka stig, sum kunnu raka russisk áhugamál.

Í 2025 er russiska virksemið kring Eystrasalt vorðið alsamt meira hóttandi ímóti NATO. Russland hevur t.d. hótt loftrúmið hjá NATO-londum bæði við stríðs- og yvirvakingarflogførum nógv oftari enn í 2024. Russisk krígsskip eru eisini meira ágangandi í sínari sigling mótvegis NATO-skipum. Russland hevur í fleiri førum mannað vápnaskipanir á krígsskipum, tá ið donsk hernaðarskip og flogfør hava verið í nánd, eisini innan fyri danskt umveldismark. Umframt henda hernaðarliga ágang heldur Russland fram við at órógva GPS-signal, og tað ávirkar bæði hernaðarliga og sivila skipa- og flogferðslu.

Russland brúkar nógvar kreftir til at verja skip úr tí sokallaða skuggaflotanum, sum førir russiska olju út gjøgnum Eystrasalt og tey donsku sundini. Skuggaflotin hevur avgerandi fíggjarligan týdning fyri Russland, tí at landið brúkar hann at skáka sær undan altjóða revsitiltøkum móti russiskum oljuútflutningi. Orkuframleiðsla stendur fyri umleið 30% av statsinntøkunum hjá Russlandi.

Russland sendi várið 2025 stríðsflogfør og vaktarskip til Finskuvík at forða fyri, at eitt estiskt vaktarskip steðgaði einum tangaskipi úr skuggaflotanum. Hendingin førdi ikki til hernaðarligan samanbrest, men slíkar støður kunnu í framtíðini elva til vápnaðan samanbrest millum hernaðarskip og flogfør úr Russlandi og NATO-londum í Eystrasalti. Um slíkir samanbrestir henda, merkir tað tó ikki við vissu, at kríggj fer at bresta á millum Russland og NATO.

### Russland vil raðfesta hernaðarútreiðslur hóast vaksandi fíggjarligt trýst

Stjórnin hjá Putin fer tey komandi árini at raðfesta útreiðslur til kríggið í Ukraina og dubbingina hjá Russlandi, og alt annað vinnuligt virksemi í tí russiska samfelagnum fer meira enn higartil at kenna svian av teimum øktu útreiðslunum. Tað kunnu koma enn álvarligari fíggjarligar fylgjur tey næstu fimm árini, t.d. við ógvisliga vaksandi inflatión ella vørutroti. Við hesum økist vandin fyri knappliga uppkomnum mótmælum í Russlandi. Tann prísin fer Putin-stjórnin tó at vilja gjalda fyri at halda fram við krígnum og dubbingini.

Russland lækkar m.a. langtíðar samfelagsíløgur til tess at útvega pengar til sínar hernaðarútreiðslur her og nú. Hóast hernaðarútreiðslurnar geva eitt íkast til landsins fíggjarliga virksemi, er tað ikki nóg mikið longur til at tryggja framhaldandi vøkstur. Russiskir myndugleikar meta sjálvir, at fíggjarvøksturin í 2025 hevur verið munandi lægri enn í 2023 og 2024, og sambært russiska ráðharranum fyri fíggjarmenning er landið enntá um reppið at fáa fíggjarliga afturgongd. Boðini skulu síggjast í tí ljósi, at Russland allarhelst medvitað reingir síni lyklatøl til tess at fjala, hvussu nógvar neiligar fylgjur veruliga eru av krígnum í Ukraina fyri Russland.

Russland fer framhaldandi at líta á, at stuttskygdar loysnir, t.d. statsstuðul og lagaligari kor fyri virkisrakstur, verða nóg mikið fyri at sleppa undan fíggjarligari afturgongd og í seinasta enda fíggjarkreppu.

Trýstið á russiska búskapin er sum heild vaksið í 2025. Tað er m.a. tí at landið hevur ikki fingið líka nógvan vinning av oljuútflutningi og gassi sum undanfarin ár. Eisini líða nógv virki undir teimum høgu rentum, sum russiski miðbankin hevur ásett til tess at fáa tamarhald á inflatiónini við atliti at teimum stóru útreiðslunum til hernaðarmál. Tær høgu renturnar gera tað dýrt hjá virkjum at taka tey lán, sum eru neyðug til at fíggja nýggjar íløgur.

Tey alsamt meira umfatandi og fjøltáttaðu vesturlendsku revsitiltøkini móti Russlandi hjálpa til at halda eitt støðugt trýst á tann russiska búskapin. Hesi revsitiltøk eru m.a. ein týðandi orsøk til, at Russland fær alsamt smærri inntøkur frá útflutningi av orku. Hóast serliga oljan kann seljast aðrar vegir, til dømis til India og Kina, hevur hesin útflutningur øktar útreiðslur við sær. Russland noyðist somuleiðis at geva stóran avsláttur fyri at fáa selt ta stóru nøgdina av olju, sum vestanlondini keyptu áður. Revsitiltøkini frá vestanlondum mótvegis russiskum oljufeløgum í oktober 2025 kunnu skerja inntøkurnar hjá Russlandi frá orkuútflutningi uppaftur meira.

## VIRKSEMIÐ HJÁ RUSSLANDI ER VORÐIÐ MEIRA HÓTTANDI Í EYSTRASALTI

Atburðurin hjá Russlandi á leiðunum í Eystrasalti er vorðin meira hóttandi mótvegis NATO. Kortið vísir dømi um tað. Hóttandi atferðin er m.a. orsakað av, at tað er umráðandi hjá Russlandi at hava fría atgongd í Eystrasalti og teimum donsku sundunum at sigla olju og hernaðarútgerð longur út í heim. Tað er myndað við prikkastrikum á kortinum.




### RUSSISKI SKUGGAFLOTIN

Russland brúkar nøkur tangaskip til at sigla við russiskari olju, sum er fevnd av revsitiltøkum frá vestanlondum. Tey flestu av hesum skipum eru skrásett aðrastaðni enn í Russlandi og sigla tískil undir fremmandafløggum. Ognarviðurskiftini hjá skipunum eru við vilja gruggað fyri m.a. at forða fyri revsitiltøkum mótvegis skipsánarunum.

Nógv skip úr skuggaflotanum eru gomul og illa røkt, og tað økir um vandan fyri ólukkum íroknað umhvørvisdálking á sjónum. Harumframt vantar nógvum av hesum skipum løggilda trygging, og tað merkir, at eingi tryggingarfeløg eru til at taka á seg kostnaðin, um ein umhvørvisdálking ella annar skaði skuldi komið fyri.

Stjórnin hjá Putin fer tey komandi árini at raðfesta útreiðslur til kríggið í Ukraina og dubbingina hjá Russlandi, og alt annað vinnuligt virksemi í tí russiska samfelagnum fer meira enn higartil at kenna svian av teimum øktu útreiðslunum.

## HALLIÐ Á RUSSISKU RÍKISFÍGGJARLÓGINI ER NÓGV VAKSIÐ Í 2025

Súlurnar vísa avlop og hall á russisku ríkisfíggjarlógini fyri árini 2021–2025. Hallið á russisku ríkisfíggjarlógini er nógv vaksið í 2025 samanborið við 2022–2024.

Orsøkirnar eru serliga minni búskaparvøkstur og minni orkuinntøkur í 2025. Stóra ríkishallið er við til at økja trýstið á russiska búskapin.




Heimild: Russiska fíggjarmálaráðið.

Onnur revsitiltøk eru vend móti russiska krígsídnaðinum og innflutninginum av vesturlendskum útbúnaði. Søguliga hevur Russland innflutt nógva vesturlendska útgerð til sín herflota, eitt nú elektronikk. Við at brúka onnur lond sum millumlið kann Russland í ávísan mun snúgva sær undan hesum revsitiltøkum, til dømis er útflutningurin hjá Kina av framleiðsluútgerð v.m. til Russlands øktur munandi, síðan kríggið í Ukraina byrjaði. Revsitiltøkini merkja tó, at tað er vorðið dýrari og truplari hjá Russlandi at fáa tann útbúnaðin til vegar, sum skal brúkast í hernaðarframleiðsluni.

Tann russiski staturin hevur lítið eftir av tiltakspeningi. Afturfyri er statsskuldin lítil, og tað gevur Russlandi eitt sindur av plássi til at halda fíggjarligt virksemi á lívi. Tað er kortini sannlíkt, at Russland má noyða bankar og feløg hjá statinum til at keypa statslánsbrøv til tess at útvega nýggja fígging. Tað verður sostatt torført hjá russiska statinum at varðveita nógv fíggjarligt virksemi í samfelagnum uttan at lata statin blanda seg uppaftur meira í fíggjargeiran, enn hann longu ger í stóran mun. Ein slík gongd fer at gera langskygdu fíggjarligu avbjóðingarnar hjá Russlandi enn torførari.

### Russland vil styrkja sína alheims ávirkan og mata undan tí hjá vesturheiminum

Ein týdningarmikil liður í royndum Russlands at styrkja sína alheims ávirkan er, at landið er til staðar altjóðaliga í Afrika, Asia, Latínamerika og Miðeystri. Tað krevjandi kríggið hjá Russlandi í Ukraina ger tó, at landsins ávirkan í øðrum økjum minkar. Tað er eisini galdandi fyri Miðasia og Suðurkaukasus, har ið londini royna at gerast minni politiskt og fíggjarliga bundin at Russlandi við m.a. at samstarva meira við aðrar partnarar.

Russland styrkir sítt politiska, fíggjarliga og hernaðarliga samstarv við Kina og Norðurkorea bæði til tess at tryggja sær stuðul til kríggið í Ukraina og til at skáka sær undan revsitiltøkum vestanífrá. Tað er eisini partvíst galdandi fyri samstarvið við Iran, sum kortini er viknað nakað í 2025 vegna kríggið millum Iran og Ísrael. At enda er tað umráðandi fyri Russland at styrkja aðrar enn vesturlendskar felagsskapir, t.d. BRIKS, sum er við til at tryggja landinum altjóða ávirkan og viga upp ímóti vesturlendskt stýrdum felagsskapum og stovnum.

### Trúttað verður niður í nýggj ættarlið um eina æviga ósemju við vesturheimin

Putin-stjórnin brúkar umfatandi propagandu til at styrkja anti-vestanrák um alt samfelagið í Russlandi. Propagandan leggur serstakan dent á nationalistisk og konservativ virði. Tað merkir, at nýggj ættarlið vaksa upp við tí lærusetningi, at Russland er í ævigum stríði við vesturheimin. Tað hendir m.a. við vaksandi hernaðardubbing av samfelagnum, har undirvísing í hernað er kravt á øllum skúlastigum og á størri statsligum arbeiðsplássum. Henda trúttan fer at hava langtíðar neiliga ávirkan á viðurskifti Russlands við vesturheimin, sum vara longur enn æviskeiðið hjá Putin. Tað er sosatt trúligt, at eftirmaður Putins fer at halda fram við kósini ímóti samanbresti við vesturheimin.

Harafturat kúgar russiski staturin røddir, sum finnast at stjórnini, í so stóran mun at tað finst eingin verulig andstøða eftir í landinum. Putin-stýrið virkar tí støðugt, og eingi tekin eru um broytingar. Men Russland hevur søguliga verið rakt av knøppum sera umfatandi samfelagsbroytingum, sum eru komnar uttan ávaring. Stýrið ansar tískil sera væl eftir at finna og svara upp á tekin um spírandi ónøgd millum fólk. ■

# TEMA: HYBRIDAMBOÐ

Hybridamboð fevna um háttaløg og førleikar, sum statir brúka til at fáa aðrar statir at vikna og avmergjast. Amboðini kunnu vera politisk, fíggjarlig, upplýsingarlig og hernaðarlig. Tey kunnu brúkast hvørt sær ella saman til at fáa størstan virknað.

Russland brúkar hybridamboð í síni roynd at fáa NATO-londini at vikna í sínum samanhaldi og sínum evnum at taka avgerðir. Endamálið hjá Russlandi er ikki at fáa skjótan vinning, men at skapa eina varandi ótrygga støðu, har ið samanhaldið í NATO spakuliga verður oyðilagt. Tað er hugsandi, at Russland vil gerast meiri hugað at herða hybridálopini, um samgongan ikki svarar aftur.

Tað er ógvuliga trúligt, at Russland sær landið at vera í einum stríði við vesturheimin, har amboðini verða hildin á lægri stigi enn í vápnaðum stríði.

Russland fremur nú hybridálop á vesturheimin, sum eru av slag og støðd, sum er nógv grovari enn tey, Russland gjørdi undan krígnum í Ukraina. Tað er hugsandi, at Russland hevur ta fatan, at landið kann brúka hesi amboð uttan at stúra fyri, at stríðið veksur, ella fyri hevndaratgerðum. Tað er eisini hugsandi, at Russland heldur NATO-lond hava tílíkt virksemi í gongd ímóti Russlandi. FE metir við støði í hesum, at Russland í løtuni førir hybridkríggj ímóti NATO og vesturheiminum.

Russland er størsta hybridhóttanin ímóti vesturheiminum og NATO. Lond sum Kina og Iran nýta eisini hybridamboð til at røkka sínum málum. Teirra virksemi er fyrst og fremst vent ímóti londum í teirra nærumhvørvi.

### HYBRIDKRÍGGJ

Hybridkríggj er ikki eitt løgfrøðiligt hugtak við støði í fólkarættinum. FE brúkar hugtakið til at lýsa eina støðu, tá ið ein statur brúkar ymisk amboð, eisini hernaðarlig, til at leggja trýst á og avmergja ein annan stat á sera ágangandi hátt uttan at fara yvir um markið til vápnað stríð.

Ein statur kann gera av at brúka hybridkríggj, um hann metir, at vanligar samráðingar ikki geva tað úrslit, sum er ynskiligt, og samstundis at vápnað stríð er ov vandamikið.

## Sabotasja

Russland hevur síðani 2023 samskipað eina rúgvu av sabotasjuhendingum ímóti Evropa. Tað er trúligt, at talan er um eina beinleiðis sabotasjuherferð úr Russlandi til at máa støðið undan evropiska stuðlinum til Ukraina.

Sabotasja er eitt munadygt hybridamboð, tí at framferðin ger tað torført fyri myndugleikarnar vestanfyri at finna útav, hvør ið stendur aftanfyri. Russland brúkar ofta persónar, sum einki hava við russiska fregnartænastu at gera, til at fremja sabotasju. Russland hevur tessvegna bara lutvíst eftirlit við herverksfólkinum. Álopini hava ofta verið rættiliga einføld at gera.

## Netálop

Russland og onnur lond, sum t.d. Iran, brúka eisini netálop til at birta ræðslu og ótryggleika ella til at ávirka politiskar tilgongdir ella avgerðir í øðrum londum. Russland hevur t.d. brúkt teldusníkar til at lata viðkvæmar upplýsingar leka til tess at seta persónar ella feløg í vánaligt ljós.

Oyðileggjandi netálop er annað amboð, sum bæði Russland, Norðurkorea og Iran hava vent ímóti øðrum londum.

Sníkabólkar, sum stuðla Russlandi, eru oftari og oftari síðani 2023 farnir at gera einføld oyðileggjandi netálop m.a. ímóti avgerandi undirstøðukervi vestanfyri. Málini vóru øll á lágum trygdarstøði. Í Danmark fingu pro-russiskir sníkar t.d. vatnrør at spreingjast á einum vatnverki í desember 2024, so at summum av viðskiftafólkunum manglaði vatn eina stutta tíð.

## RUSSISKAR FREGNARTÆNASTUR LEGGJA ÆTLANIR UM SABOTASJU Í EVROPA

Russiskar fregnartænastur brúka m.a. millummenn til at útvega persónar, sum fáa løn fyri at gera uppgávur, ið hava við njósning og sabotasju at gera. Henda tilgongd kann fara fram á sosialum miðlum. Tí vita brotsfólkini viðhvørt ikki av, at tey arbeiða fyri eina russiska fregnartænastu.



## ÁVIRKAN Á FÓLK OG LEIÐARAR Í ØÐRUM LONDUM KANN FÁAST Í LAG Á YMSAN HÁTT



### FALSKUR BOÐSKAPUR

Danmark og Grønland vóru sannlíkt rakt av ávirkanarvirksemi fyrst í 2025. Tað snúði seg um falskan boðskap, sum danskur politikari varð lagdur undir at bera. Russland royndi at gagnnýta almenna kjakið um viðurskiftini millum Danmark og Grønland til tess at skaða viðurskiftini millum Kongsríki Danmarkar og USA.



### NÝTSLA AV PRIVATUM VIRKANDI

Russiski staturin útveitir ofta ávirkanarátøk. Til dømis verða privat virki við serkunnleika í kunningartøkni, miðlum og samfelagsvísindum nýtt til at menna og fremja ávirkan fyri Russland.



### FÁA Í LAG SAMBOND

Kina brúkar felagsskapir, sum hava tilknýti til Kommunistaflokkin, til at fáa í lag sambond við politikarar í øðrum londum, som Kina roynir at gera til forsprákarar fyri kinesiskum áhugamálum.



### NETÁLOP

Statir brúka netálop til ávirkan m.a. við at breiða út politiskan boðskap um somu tíð sum álopini. Boðskapurin verður ofta lagdur á sosialar miðlar, men stundum enntá settur beinleiðis inn á skíggjan hjá ofrunum.

Felags fyri álopini hevur higartil verið, at tey kravdu ikki langa fyrireikingartíð ella serliga tøkniliga vitan.Ouvikarnir hava eisini skrivað um álopini á sosialum miðlum fyri at fáa ans. Hóast avleiðingarnar higartil hava verið avmarkaðar, kunnu tílík álop møguliga fáa álvarsligar fylgjur, tí at sníkarnir leggja nógv fyri, m.a. tí at teir leggja eftir skipanum, sum verða nýttar í avgerandi undirstøðukervi.

Sníkar, sum stuðla Russlandi, hava eisini staðið á odda fyri órógvandi netálopum í síni roynd at gera heimasíður hjá donskum myndugleikum og virkjum óatkomuligar. Sannlíkt hava summir av teimum pro-russisku sníkabólkunum samband við russiska statin.

**NETHÓTTANIN MÓTI DANMARK**

Stýrið fyri Samfelagstrygd (SAMSIK) metir nethóttanina móti Danmark.

SAMSIK heldur, at hóttanarstigið frá:

- Netnjósning er SERA HØGT
- Netmisbroti er SERA HØGT
- Netaktivismu er HØGT
- Oyðandi netálopum er MIÐAL
- Netvaldsgerðir er EINGIN

Hóttanarmetingin kann síggjast á heimasíðuni hjá  SAMSIK www.samsik.dk

### Hernaðarligur ágangur

Hernaðarligt virksemi kann eisini brúkast sum hybridamboð, bara tað ikki fer um markið til kríggj.

Russiskar herdeildir hava soleiðis síðani 2022 borið seg meira hóttandi og ágangandi at enn áður. Tað fevnir m.a. um fyrilitsleysa sigling, at látast leypa á NATO-eindir og at órógva samskifti og GPS-signal hjá bæði sivilum og hernaðarligum skipum og flogførum.

Tað eru eisini dømi um, at Russland hevur borið seg sera ágangandi at mótvegis NATO-londum, tá ið tey hava virkað nær Russlandi. Tað hendi t.d., tá ið eitt russiskt stríðsflogfar skeyt eitt luft-til-luft missil ímóti einum bretskum upplýsingarflogfari yvir Svartahavi í september 2022.

Russland hevur eisini ferð eftir ferð gjørt seg inn á loftrúmið í NATO-londum, m.a við álopsdronum og stríðsflogførum. Slík brot eru vaksin munandi í tali í 2025.

Kina brúkar hernaðaramboð á sama hátt í sínum nærumhvørvi. Kina ber seg m.a. hóttandi at móti Taivan og siglir við vilja inn í filipinsk skip á leiðum í Suðurkinahavi, sum ósemja er um.

### Árin

Russland roynir framhaldandi at ávirka politiskar avgerðir og almenna hugburðin í Evropa, íroknað Danmark. Hetta árinsvirki hendir alla tíðina og hevur, síðani kríggið í Ukraina byrjaði í 2022, serstakliga havt sum endamál at íbirta klandur í Evropa og minka um stuðulin vestaneftir til Ukraina.

Árinsvirksemið hendir bæði umvegis pallar á internetinum og umvegis árinsumboð. Árinsumboð eru persónar, sum arbeiða saman við fremmandum fregnartænastum við tí fyri eyga at skapa og brúka sambond í øðrum londum til at ávirka.

Eftir nøkur ár við avmarkaðum sambandi við evropiskar politikarar beint eftir krígsbyrjan í Ukraina er Russland aftur farið at bjóða politikarum til ráðstevnur í landinum. Hetta ger Russland fyri at knýta eitt samband, sum landið kann brúka seinni í sinum árinsvirksemi.

Kina roynir at ávirka almenna hugburðin í vesturheiminum fyri á tann hátt bæði at verða sætt í jaligum ljósi og ávirka politiskar avgerðir, so at tær verða til fyrimun fyri Kina.

Russland og Kina venda sær ofta við sínum árinsvirksemi ímóti ungum og komandi valdshavarum og áskoðanarmyndarum í øðrum londum. Kina nýtir serstakliga felagsskapir, sum eru knýttir at kommunistaflokkinum, til at skapa eitt samband við politikarar, sum kunnu fremja jaliga uppfatan av Kina. Tað kann í framtíðini brúkast til at ávirka politikkin í øðrum londum, so at hann gagnar kinesiskum áhugamálum.



# ARKTIS

## TRYGDARPOLITISKU SPENNINGARNIR MILLUM RUSSLAND, KINA OG USA HAVA BREITT SEG TIL ARKTIS



Russland, Kina og USA hava ymisk áhugamál í Arktis, men øll tráa eftir øktum leikluti har. Trygdarpolitiski áhugin hjá USA fyri Arktis er øktur munandi tey seinastu árini, meðan Russland heldur á við síni dubbing, og Kina arbeiðir støðugt fram ímóti at kunna sigla á og undir sjónum har á leiðini. Russland hevur enn ta sterkastu hermegina í Arktis, men kennir sína støðu hótta av vesturheiminum. Russland fer tí í alsamt størri mun at verja síni áhugamál við hóttandi politiskum og hernaðarligum atburði. Russland er kroyst av vesturlendskum revsitiltøkum v.m. og fer tí at økja sítt samstarv við Kina og geva Kina størri atgongd til sínar arktisku leiðir.

**Tvey kinversk granskingarskip undir 15. Arktisku Kanningarferð hjá Kina í Norðuríshavi í august 2025. Kanningarnar vórðu í høvuðsheitum gjørdar norðan fyri USA og Kanada uml. 1.000 km í ein útnyrðing úr Grønlandi. Xinhua/Abaca/Ritzau Scanpix**

■ Kappingin millum stórveldini Russland, Kina og USA fer í vaksandi mun eisini fram í Arktis. Økið er ikki longur at meta sum lágspenningsøki, sum tað var, áðrenn Russland leyp á Ukraina í 2022. Arktis verður alt týdningarmiklari hernaðarliga, so hvørt sum ósemjan millum Russland og vesturheimin harðnar. At USA bart út sigur seg hava trygdarpolitiskan áhuga fyri Arktis fer at seta ferð á hesa gongd.

Tann vaksandi kappingin millum stórveldini í Arktis hevur økt munandi um altjóða uppmerksemi fyri økinum. Tað er serstakliga galdandi fyri vaksandi áhugan hjá USA fyri Grønlandi og tess týdning fyri trygdina í USA. Uppmerksemið økir samstundis vandan fyri njósning, eisini netnjósning og royndum at ávirka enn meira í øllum pørtum av Kongsríki Danmarkar.

Arktis hevur stóran hernaðarstrategiskan týdning, serstakliga tí at meginparturin av ballistiskum missilum hjá Russlandi, Kina og USA fara at flúgva yvir Arktis, um stórkríggj verður millum tvey ella fleiri av londunum.

Russland hevur í meira enn eitt tíggjuáraskeið útbygt sínar hernaðarstøðir og nýmótansgjørt sínar deildir í Arktis. Hernaðarliga er Russland enn tað sterkasta landið í Arktis, hóast kríggið hjá Russlandi í Ukraina seinkar og avmarkar russisku ætlanirnar um at dubba seg har.

Størri parturin av russisku kjarnorkuvápnaðu kavbátum hevur støð í Arktis. Kavbátarnir eru avgerandi í ætlanini hjá Russlandi at ræða USA frá at leypa á Russland, av tí at teir eru trygd fyri, at Russland kann svara aftur við kjarnorkuvápnum.

Grundin til, at USA hevur vaksandi áhuga fyri Arktis, er hægri raðfesting av at verja nærumhvørvið hjá USA. Landið hevur tey seinastu árini vaksið um sítt hernaðarliga virksemi og hevur venjingar saman við sameindum í økinum, íroknað Danmark. Hjá USA er Aktis tann fyrsta og týdningarmiklasta fráboðanarlinjan, um eitt stórkríggj skuldi brostið á við Russland ella Kina. Radararnir við rúmdarstøðina Pituffik skulu hjálpa til at varnast fíggindamissil ávegis ímóti amerikanska meginlandinum.

Metingin hjá USA av støðd og slag av framtíðar kinesiskum hernaðarvirksemi í Arktis er týdningarmikil partur av skyldunum hjá USA á leiðini. USA tekur kinesiskt hernaðarvirksemi í Arktis í álvara, serstakliga tætt við landøki hjá USA. Kina er størsti trygdarpolitiski kappingarneyti hjá USA, og tað verður umráðandi hjá USA at royna at ræða Kina frá at senda hernaðarskip og -flogfør til Arktis.

### Russland raðfestir enn Arktis frammarlaga

Russland hevur stórar ætlanir fyri alt sítt arktiska øki – bæði hernaðarliga og sivilt. Hvørki kríggið í Ukraina ella økti áhugin hjá USA fyri Grønlandi og Arktis hevur broytt landsins langtíðar áhugamál og endamál í økinum. Hernaðardubbingin hjá Russlandi skal tryggja, at landið fær varðveitt sína hernaðarligu yvirvág har. Russland vil serstakliga hava eftirlit við atkomuvegunum til russiska Arktis. Russland ráðleggur tí alsamt um at styrkja sína hernaðarmegi í Arktis við at dubba sína landdeildir í Útnyrðingsrusslandi, styrkja norðurflotan og halda fram við nútímansgerð og útbygging av hernaðarligum undirstøðukervi í øllum sínum arktiska øki. Russland hevur longu avmarkað siglingarrætt í summum farvatni norðan fyri Russland meira, enn altjóða havrættur loyvir, og landið fer møguliga at gera enn strangari reglur. Harafturat vil Russland gagnnýta tað náttúrutilfeingi, sum finst í landsins arktiska øki.

Møguleikarnir hjá Russlandi at røkka sínum málum valdast nógv um, hvussu kríggið í Ukraina gongur. Kríggið tærir landsins hernaðarliga og fíggjarliga tilfeingi. Russland er samstundis heft at útlendskum íløgum og innflutningi av serstøkum lutum, sum ofta eru undir avmarkingum av revsitiltøkum, og sum í stóran mun verða umvegis triðjalond.

Russland møtir tó eisini øðrum avbjóðin gum aftur at avmarkingum í fíggjarligum førleika. Økt virksemi hjá vestanlondum í Arktis, limaskapur Svøríkis og Finnlands í NATO og dubbingarætlanir hjá vestanlondum í Arktis fer serstakliga at gera tað torførari hjá Russlandi at varðveita sína yvirvág á leiðini.

## MØGULIGAR LEIÐIR FYRI LANGTBERANDI MISSIL, UM KRÍGGJ BRESTUR Á

Stytsta leið millum Norðuramerika og Russland fer yvir Norðpólin.
Kortið vísir møguligar leiðir hjá missilum, sum verða skotin úr Russlandi móti USA.



## NORÐURATLANTSHAV ER PORTRIÐ TIL OG FRÁ ARKTIS

Russland nýtir ein og hvønn hátt at vaka yvir og kortleggja havleiðirnar millum Grønland, Ísland, Føroyar og Bretland, sonevnda GIUK-kjaftin. Tað hendir sum fyrireiking til eitt møguligt stríð við NATO.



Hóast Russland hevur sent nógv av tí fólki og tí útgerð, sum hoyrdi heima í Arktis, til kríggið í Ukraina, eru landsins týdningarmiklastu styrkir í Arktis sum heild óskerdar. Til dømis hevur norðflotin enn skip, álopskavbátar og kjarnorkuvápnaðar kavbátar. Hóast meginparturin av russisku flogmegini er sendur í kríggj, kann Russland skjótt flyta stríðs- og bumbuflogfør til sínar støðir í Arktis. Haðani kann Russland við stuttari ávaring leypa á vesturlendsk mál í stórum pørtum av Arktis og Norðuratlantshavi.

Russland hevur góðar fortreytir fyri at vera til staðar hernaðarliga í Arktis. Grundin er fyrst og fremst tað sivila undirstøðukervið, sum er bygt til at stuðla upp undir fíggjarligar verkætlanir og tær hernaðarligu støðirnar, sum Russland hevur bygt seinasta tíggjuáraskeiðið. Tað fevnir um fastar støðir fram við strondini og støðir á oyggjum norðan fyri Russland, sum veita eina framskotna verjulinju í Norðuríshavi.

Russland ræður eisini yvir sera stórum tali á sivilum ísbrótarum, sum kunnu víðka rásarúmið hjá russiska flotanum, um kríggj ella kreppa skuldi leikað á. Fleiri av ísbrótarunum kunnu ivaleyst gerast út við missilskipanum, sum fáa lopið á bæði skip og mál á landi.

At Russland vil hava eftirlit í Arktis hevur sín uppruna í teirri russisku fatan, at norðurparturin av landinum er viðkvæmur. Russland stúrir fyri, at landið fær ikki vart seg ímóti álopum norðaneftir, og Russland er sannført um, at hóttanin veksur, tess meira vesturheimurin økir sína styrki, og at minkandi ísur ger norðurstrond Russlands opnari. Russland heldur ikki, at landsins núverandi styrki er nóg mikið til at fáa eftirlitið í Arktis, sum tey ynskja sær. Dubbingin í Arktis hevur sostatt fremstu raðfesting. Sum eitt dømi um hetta gjørdist tann nýggjasti russiski kjarnorkuvápnakavbáturin partur av Norðurflotanum í juli 2025. Tað er tó ikki sannlíkt, at Russland, so leingi kríggið í Ukraina heldur fram, fer at fáa útint allar sínar arktisku ætlanir um dubbing og nútímansgerð í verk tey næstu trý til fimm árini.

### Norðuratlantshav hevur avgerandi týdning fyri Russland

Hjá Russlandi eru farvøtnini millum Grønland, Ísland, Føroyar og Bretland, tann sokallaði GIUK-kjaftin, tann týdningarmiklasti atkomuvegurin til og úr Arktis. GIUK-kjafturin er sostatt av alstórum týdningi fyri Russland, skuldi vápnað stríð tikið seg upp við NATO.

Í slíkum stríði hevði Russland roynt at lopið á veitingarrásirnar millum USA og Evropa við álopskavbátum, sum millum annað skulu fáa siglt gjøgnum GIUK-kjaftin uttan at verða sæddir. Samstundis vil Russland raka við kavbátar hjá NATO, sum sigla gjøgnum kjaftin.

Russland hevur tessvegna regluliga yvirvaking av virkseminum hjá NATO og kortleggur alt farvatn í GIUK-kjaftinum. Tað verður gjørt bæði við hernaðarligum og sivilum skipum, m.a. fiskiskipum og øðrum miðlum sum t.d. flogførum og satelittum. Russland brúkar hesar upplýsingar til at dagføra sínar ætlanir um hernaðartiltøk í økinum. Russland vil frá byrjan og í framhaldi av vápnaðum stríði við NATO darva skipum hjá NATO í siglingini og sabotera ella leypa á avgerandi undirstøðukervi í sjónum.




## KINA FYRIREIKAR SEG TIL AT VERA TIL STAÐAR HERNAÐARLIGA Í ARKTIS

Kina siglir við ísbrótarum og granskingarskipum í Arktis og hevur saman við Russlandi gjørt venjingar í vaktarhaldi á leiðini. Endamálið er at gerast ført fyri sjálvt at virka hernaðarliga í Arktis. Virksemið hjá Kina fer í høvuðsheitum fram í tí partinum av Arktiska havi, sum liggur norðan fyri Beringssund norður ímóti Norðpólinum.

### Kina sær Arktis í alheimshøpi

Hernaðarliga endamálið hjá Kina í Arktis er heft at landsins kapping við USA. Kina er ikki enn til staðar hernaðarliga í Arktis, men landið hevur ætlanir um at kunna sigla um fimm til tíggju ár við sínum egnu skipum og kavbátum. Endamálið hjá Kina er at sigla við missilkavbátum undir ískápuni til tess at vera eins klárt og Russland og USA at svara aftur upp á kjarnorkuvápnaálop.

Kina hevur við sínum granskingarísbrótarum fingið atgongd til Norðuríshavið. Hvørt ár ger landið granskingarferðir í Arktis og savnar dátur til at stuðla ætlanini at fáa siglt bæði við skipum og kavbátum har.

Kina víðkar við ferð sín ísbrótaraflota. Í 2024 hevði Kina fyri fyrstu ferð tríggjar ísbrótarar í Arktis í senn. Í 2025 vóru fýra ísbrótarar og eitt rannsóknarskip á ferð í Arktis. Tey seinastu árini hevur hetta virksemi verið savnað á havøkinum norðan fyri Beringssundið.

Kina hevur eisini framtíðar fíggjarlig áhugamál í Arktis, og landið vil hava atgongd til sjóleiðir og náttúruríkidømi har. Frí atgongd til arktiskar sjóleiðir skal gera Kina minni heft at leiðum umvegis m.a. Suesveitina og Malakkasundið. Um slíkar leiðir verða stongdar t.d. í einari kreppustøðu, fær tað stórar avleiðingar fyri kinesiskan búskap. Atgongd til náttúrutilfeingi í Arktis skal vera við til at tryggja, at Kina fær innflutt orku og mineral ymsastaðni úr heiminum.

Í Grønlandi hevur íløguhugurin frá kinverskum fyritøkum ikki givið ítøkilig úrslit. Langtíðar áhugin hjá Kina fyri Arktis fatar tó eisini um Grønland, og Kina fer framhaldandi at vísa serligan áhuga fyri gransking umframt handilsligum samstarvi við Grønland.

### Russland og Kina vilja hava tættari samstarv í Arktis – møguliga eisini hernaðarliga

Samstarvið millum Russland og Kina í Arktis fer at gerast tættari og breiðari komandi árini, hóast tey bæði londini hava mótsett áhugamál á leiðini. Russland vil sum útgangsstøði, at bara arktisk lond skulu hava ávirkan og kunna vera til staðar hernaðarliga í Arktis, t.d. við skipum og flogførum. Russland vil sostatt ikki, at Kina skal vera hernaðarliga til staðar har.

Russland hevur tó nógv veikari samráðingarstøðu enn Kina. Tískil heldur Russland seg noyðast at geva Kina størri atgongd til og ávirkan í Arktis. Russland livir við hørðum revsitiltøkum, sum gera tað torført at gagnnýta teir fíggjarligu møguleikar, sum liggja í stórum jarðgoymslum av olju, gassi og mineralum í russiska Arktis. Russland hevur brúk fyri útlendskari tøkni, vitan og fígging – bæði fyri at røkja núverandi verkætlanir og menna nýggjar. Russlands útflutningur av náttúrutilfeingi úr Arktis fer ivaleyst at gerast týdningarmiklari, so hvørt sum revsitiltøk og kríggið í Ukraina fáa avmergjað russiska búskapin.

Kina vil tránýta sína sterkaru støðu mótvegis Russlandi til at tryggja sær bíligt náttúrutilfeingi og betri atgongd til siglingarleið norðan fyri Russland. Kina hevur tey seinastu árini havt trupult við at stovna nýggjar búskaparligar verkætlanir ella nýggj rannsóknartiltøk í vesturarktiskum londum. Amerikanskur áhugi fyri økinum fer bara at elva til fleiri trupulleikar fyri Kina. Sostatt fer Russland alt meira at gerast týdningarmiklasta atgongdin hjá Kina til Arktis.

Kina fer eisini at leita sær russiska vitan og royndir um Arktis sum hernaðarligt arbeiðsøki. Russland hevur undandragið í mun til Kina, tøkniliga og viðvíkjandi royndum, serstakliga tá ið tað snýr seg um at sigla við missilkavbátum undir ísinum í Arktis og byggja kjarnorkuriknar ísbrótarar. Tað kann hugsast, at tey bæði londini fara at hava felagsvenjingar í russiskum Arktis í 2026. Felagsvenjingar í og uttan fyri Arktis fara at senda strategiskt atlát til USA og vesturheimin frá báðum londum. Um Russland vil útinna felagsvenjingar við Kina í Arktis fer av tí sama at valdast um viðurskiftini millum Russland og USA.

Um Russland og USA fáa fastar reglur fyri partar av sínámillum viðurskiftum, kann tað fáa ávirkan á samstarvið við Kina í Arktis. Til dømis kunnu amerikanskar íløgur í russiskar orkuætlanir í Arktis og tilíkt gera Russland minni heft at Kina. Soleiðis kann Russland møguliga gerast trekari at lata Kina størri atgongd til russiska partin av Arktis.

### Russland fer at leggja harðari fyri í Arktis

Russland væntar, at vesturheimurin fer at gagnnýta, at Russland er upptikið av krígnum í Ukraina, til at máa burtur av russiskum eftirliti norðanfyri. Tessvegna raðfestir Russland við sama lag at hava vaktarhald við skipum og flogførum í øllum pørtum av russiskum Arktis og í Norðuríshavi.

Russland fer at royna at ræða vesturheimin frá at koma hernaðarliga ov nær sínum arktiska øki. Um Evropa og USA fara at økja sítt virksemi í Arktis, fer Russland tískil at svara aftur við at royna at vísa styrki – eisini á nýggjan hátt. Russland fer ivaleyst í størri og størri mun at bera seg óvæntað og áleypandi at. Tað kundi verið við at svara harðliga aftur t.d. við vandafullari sigling ella simuleraðum álopum, um vestanlond hava hernaðarligar venjingar í økinum. Russland fer eisini at kunna órógva ella enntá steðga fiskiskipum í nánd av russiska Arktis.

Russarar kunnu fara at vísa sama váðafýsni og atburð í Arktis, sum teir vísa í Eystrasalti, og tað kann halda fram, eftir at kríggið í Ukraina er av.

### Hóttanin frá Russlandi ímóti Kongsríki Danmarkar er ein onnur í Arktis og Norðuratlantshavi

Hernaðarliga hóttanin frá Russlandi ímóti Kongsríki Danmarkar fer at vaksa tey komandi árini, men hóttanin um beinleiðis hernaðarligt álop frá Russlandi ímóti Grønlandi og Føroyum líkist ikki hóttanini ímóti Danmark. Russland sær ivaleyst Grønland og Føroyar í norðuramerikanskum samanhangi, og tað merkir, at Russland ikki neyðturviliga fer at draga Føroyar og Grønland inn í eina evropeska ósemju.

Kongsríki Danmarkar kann tó uppliva alsamt harðrendari russiska atferð í Norðuratlantshavi og Arktis. Tað russiska váðafýsni, sum vit hava sæð í sambandi við nýtslu av hybridamboðum móti vestanlondum, kann eisini fáa ein avgerandi leiklut í Arktis. Harafturat kemur, at Russland – hóast langt burturi – viðhvørt sendir kavbátar, skip og flogfør tætt upp at Grønlandi og Føroyum umframt inn á allar leiðirnar teirra millum. Russland nýtir eisini sivil skip, sum sigla her um vegir, til eftirlitsuppgávur o.a.m. fyri tann russiska statin.

Russland fer eisini meira og meira at skúgva altjóða reglur og siðvenjur til viks. Til dømis fer Russland møguliga eisini at kanna sær yvirræði yvir leiðum, sum Russland eftir altjóða lóg ikki hevur ræði á. Í síni dagførdu sjólæru frá 2022 loyvir Russland sær at nýta hermegi allastaðni á tí ytra landgrunninum, sum landið ger krav um.

Um Russland fer at handhevja yvirræði longur norður úr Russlandi, enn altjóða lóg loyvir, verður vandi fyri beinleiðis vápnaðum samanbresti við donsk ella onnur skip ella flogfør vestanífrá.

Hóast hesa meira áleypandi atferð vil Russland, tá ið tað passar teimum, tosa um tørvin á samstarvi í Arktis. Russland fer óivað at leggja trýst á formansskapin hjá Kongsríki Danmarkar í Arktiska Ráðnum um at fara undir virksemi við russiskari luttøku. Tað er eisini trúligt, at Russland so av og á fer at finnast at Kongsríkinum og øðrum arktiskum londum vestanfyri fyri at skaða umhvørvið í Arktis ella gera seg inn á rættindi hjá upprunafólkum. Russland fer m.a. at grundgeva við, at tað núverandi avmarkaða samstarvið í Arktiska Ráðnum er til ógagns fyri økið.

Russland hevur tó ikki sjálvt fyrilit hvørki fyri upprunafólki ella umhvørvi í Arktis, tá tað ræður um at røkka sínum egnu málum í økinum. Í 2024 læt Russland – ímóti sínum egnu reglum – nógv skip, m.a. oljutangaskip – sigla í ísløgdum farvatni, hóast tey ikki vóru bygd til tað. Russland hevur tey seinastu árini eisini kúgað russisk NGO-umboð fyri upprunafólk í russiska Arktis. ■




## KINA VIL FÁA VIRKAÐ VIÐ KAVBÁTUM Í ARKTIS

Arktis er eitt frálíkt stað til at skjóta kjarnorkumissil ímóti málum á allari norðaru hálvkúlu, tí at flúgvitíðin verður so stutt, at tað verður torført at verja seg ímóti teimum. Tað er eisini ein fyrimunur, at ískápan í Arktis ger tað lætt at fjala kavbátar. Tískil er førleikin at virka við missilbátum undir ískápuni í Arktiska havi partur av møguleikunum hjá bæði Russlandi og USA at hevna eitt kjarnorkuálop.

Henda førleika vil Kina sum kjarnorkuveldi eisini hava, og treytin fyri at fáa hann er, at landið fær siglt við kjarnorkuriknum kavbátum undir havísinum í Arktis. Kina vil tí menna síni evni at virka við kavbátum í Arktis.

Kavbátar kunnu verða styrktir 1, so at teir kunnu bróta upp gjøgnum havísin 2 Allir stórir kavbátar kunnu eisini brynjast við missilum, sum røkka upp til 10.000 km, og sum kunnu vera vápnaðir við kjarnorkuspreingiløðingum 3.

# TEMA: HÓTTANIN ÍMÓTI AVGERANDI UNDIRSTØÐUKERVI

Ymisk lond, serstakliga Russland, umboða týðandi hóttanir ímóti avgerandi undirstøðukervi í vesturheiminum. Sníkar, sum stuðla Russlandi, gera longu einføld netálop ímóti avgerandi undirstøðukervi v.m. vestanfyri. Eisini hevur Russland síðani 2023 staðið aftan fyri fleiri sabotasjuhendingar ímóti málum í Evropa.

Tað kann hugsast, at álop í framtíðini á avgerandi undirstøðukervi kunnu fáa alsamt álvarsligari og meira umfatandi fylgjur fyri samfelagsvirki sum t.d. flutning, ravmagnsveiting og internet. Henda hóttan sæst í løtuni, m.a. við at fremmandir statir fyrireika seg til at kunna leypa á avgerandi undirstøðukervi. Fyrireikingarnar verða bæði gjørdar fysiskt og talgilt og fevna um nógv sløg av undirstøðukervi, t.d. kaðlar, rørleidningar, havnir og flogvøllir.

### Avgerandi undirstøðukervi undir sjónum er viðkvæmt

Russland kortleggur miðvíst avgerandi undirstøðukervi í Danmark. Tað er eisini galdandi fyri undirsjóvarútbúnað í og í nánd av kongsríkisins farvatni. Hetta ger Russland ivaleyst til tess at eyðmerkja hugsandi mál fyri sabotasju ella álopi á avgerandi undirstøðukervi undir sjónum, sum t.d. sjókaðlar til ravmagn og internet, skuldi ein vaksandi ósemja ella kríggj við NATO tikið seg upp. Russland hevur førleikar til at leypa á undirsjóvarútbúnað við t.d. kavbátum og undirvatnsdronum. Hesir førleikar verða alsamt mentir og betraðir.

Tað er torført at verja undirsjóvarútbúnað ímóti álopum, tí at kervið ofta røkkur um stórar havvíddir, sum tað er torført at vaka yvir og verja. Av somu orsøk kann tað ofta vera torført at avgera við vissu, hvør ið framdi eitt álop.

Hvørt ár verða alsamt fleiri kaðlar oyðilagdir í Eystrasalti. Talið áv hendingum, har kaðlar ella annað undirstøðukervi í Eystrasalti verður oyðilagt, hevur tey seinastu tvey árini verið tað sama sum tað seinasta tíggjuáraskeiðið. Skaði hendir javnan á undirstøðukervið til havs, men tað er vanliga ikki vegna sabotasju ella álop. Skaði hendir ofta um veturin av óhappi við fiskireiðskapi og akkeri á botni vegna óveður. Undirstøðukervið í donskum farvatni og Eystrasalti er serstakliga viðkvæmt í so máta.

### Statsligir sníkar fyrireika at fáa sløkt avgerandi undirstøðukevi

Russland er ført fyri at gera nógv álvarsligari oyðileggjandi netálop enn tey einføldu álop ímóti avgerandi undirstøðukervi vestanfyri, vit hava sæð higartil. Tað hevur Russland víst fleiri ferðir í Ukraina, har ið sníkar hjá russiska statinum m.a. hava sløkt avgerandi undirstøðukervi.

Eitt umfatandi oyðileggjandi netálop fer at kunna raka stóran part av Danmark í einum. Tað kundi t.d. verið eitt netálop, sum sløkti ravmagnsveiting ella internet í fleiri tímar ella dagar á stórum øki. Tað kundi hugsandi eisini havt ávirkan í øðrum londum, eins og álop í øðrum londum kunnu ávirka Danmark.

Tað er neyvan sannlíkt , at Russland, sum støðan er nú, fer at gera slík netálop ímóti Danmark. Tó hava russiskir sníkar nú í eini tvey ár havt áhuga fyri donskum avgerandi undirstøðukervi. Tað er tí trúligt, at Russland longu nú roynir at treingja inn í danskt og vesturlendskt avgerandi undirstøðukervi. Trúliga hevur partur av hesum virksemi sum endamál at fyrireika oyðileggjandi netálop ímóti undirstøðukervinum, sum Russland kann velja at gera onkuntíð seinni. Hóttanin kann sostatt skjótt vaksa.

Sníkarnir hjá russiska statinum hava m.a. áhuga fyri málum, sum eru týdningarmikil í danska samfelagnum, og sum eisini hava stóran týdning í einari møguligari ósemju millum NATO og Russland.

Hóast Kina hevur førleika til tess, er tað ikki trúligt, at Kina í løtuni fer at gera oyðileggjandi netálop ímóti avgerandi undirstøðukervi í Kongsríki Danmarkar. Í hørðum stríði t.d. millum Kina og Taivan kann hetta tó broytast. Um so var, hevði Kina ivaleyst vent netálopum ímóti teimum londum, sum sambært Kina vildu stuðlað Taivan hernaðarliga.



**Tøkni úr øðrum londum kann merkja viðkvæmi**
Fleiri lond lata trygdar- og fregnartænastum atgongd til ella eftirlit við talgildum vørum. Tað ger t.d. Kina.

Tað kann m.a. fevna um talgilda útgerð til vanligar brúkarar sum t.d. beinarar, men eisini lutir í avgerandi undirstøðukervi sum t.d. orku- ella telekervi.

Atkoma til ella ræði á talgildari útgerð kann geva landi sum Kina høvi til at misnýta viðkvæmar vørur. Vitan um viðkvæmi kann verða misnýtt til m.a. at bróta inn í útgerð, sum er knýtt í internetið. Endamálið kann antin vera netnjósning ella at oyðileggja avgerandi undirstøðukervi.

## UNDIRSTØÐUKERVIÐ Í EYSTRASALTI

Eystrasalt er serliga viðbrekið fyri óhappi, har skip draga akker eftir havbotninum.

- Nógv skipaferðsla er í Eystrasalti, so vandin fyri vanlukku er størri enn á leiðum við færri skipum.
- Eystrasalt er grunt, so eitt akker kann dreggja eftir botni flestustaðni.
- Eitt víðfevnt undirsjóvar undirstøðu-kervi er skipað í Eystrasalti, so eitt akker, ið drigið verður aftur úr skipi, hevur stóran møguleika at raka kaðlar og rørleiðingar.
- Serliga á vetri kann veðrið í Eystrasalti vera ilsligt við stórari aldu, og tað økir vandan fyri, at eitt akker ótilætlað kann losna og verða drigið eftir botni.




Heimild: submarinecablemap.com



# KINA

## KINA FYRIREIKAR SEG TIL SAMANBREST VIÐ VESTANLOND



Kina tráar m.a. eftir eini leiðandi støðu í Asia og at noyða eina endursameining við Taivan. Í báðum førum krevst ein styrkt støða serliga mótvegis USA. Tí dubbar Kina seg og styrkir samvinnuna við Russland og viðurskiftini við onnur lond uttan fyri vesturheimin. Samstundis virkar Kina fyri at gera sína fíggjarligu og tøkniligu menning óhefta at londum í vesturheiminum. Sum heild frireikar Kina seg til eitt hert stríð við vesturheimin.

**Hersýning í Beijing í september 2025.**
**Imago/Ritzau Scanpix**

Kina vil vera tað sterkasta valdið í Asia og eitt av fremstu alheimsveldum. Til at røkka tí máli leggur Kina m.a. politiskt, búskaparligt og hernaðarligt trýst á grannalondini, nýmótansger sínar hernaðardeildir og útvegar sær vitan og tøkni úr øðrum londum.

Kina sær USA sum ein mótpart, sum roynir at steðga menningini i Kina og forða tí at gerast eitt alheims stórveldi. Tískil fyrireikar Kina seg til at kunna klára seg gjøgnum ósemjur, m.a. við dubbing og við at hava búskaparliga og tøkniliga menning, sum er óheft av vesturheiminum.

### Vandin fyri samanbresti um Taivan veksur

Kina sær Taivan sum óloysiligan part av Kina, sum tað noyðist at hava eftirlit við, um tað skal røkka sínum máli at gerast eitt av fremstu alheimsveldum. Vald yvir Taivan fer eisini at geva Kina fría atgongd til vestara part av Kyrrahavi, skuldi ein ósemja við USA komið í. Sostatt er eitt av týdningarmiklastu málunum hjá kommunistaflokkinum í Kina og forsetanum Xi Jinping, at Taivan skal sameinast við Kina. Tí málinum stýra teir eftir við góðum toli.

Kinna leggur á ymsan hátt trýst á Taivan í síni roynd at noyða Taivan til sameining við amboðum, sum ikki føra til veruligt kríggj. Kina ber seg hóttandi at mótvegis Taivan, ikki minst hernaðarliga. Kinesisk krígsskip og flogfør eru næstan dagliga stødd rundan um Taivan. Síðani 2022 hevur Kina eisini havt sera stórar venjingar, har herurin hevur vant avbyrging og bumbing. Tað kann vera torført at skilja ímillum venjingar og fyrireiking til veruligar krígsatgerðir. Kina venur eisini regluliga at seta herdeildir í land á úrvaldum støðum fram við sínar strendur.

Somuleiðis brúkar Kina árinsherferðir og njósning, íroknað netnjósning ímóti Taivan. Kina roynir haraftturat at avbyrgja Taivan diplomatiskt. Til dømis leggur Kina trýst á onnur lond, at tey skula ikki taka ímóti Taivanskum politikarum sum gestum ella lýsa Taivan sum sjálvstøðugt land. Lond í vesturheiminum kunna eisini verða rakt av kinesiskari ávirkan og spionasju sum einum liði í kinesiskum trýsti á Taivan og fyrireiking til møguligt stríð.

Kina vil helst hava friðarliga sameining. Men hernaðarvenjingarnar hjá Kina og tann skjóta dubbingin, sum Kina fremur, merkja kortini at vandin veksur so líðandi fyri kríggi um Taivan. Xi Jinping hevur sett 2027 sum freist fyri, nær ið kinesiski herurin skal vera til reiðar at taka Taivan, og tað er trúligt at herurin fer at røkka málinum. 2027 er sett til tess at fremja nútímansgerð av herinum og skal ikki skiljast soleiðis, at Kina hevur avgjørt at byrja eitt kríggj.

Kina vil helst hava friðarliga sameining. Men hernaðarvenjingarnar hjá Kina og tann skjóta dubbingin, sum Kina fremur, merkja kortini, at vandin veksur so líðandi fyri kríggi um Taivan.

## KINA ØKIR HERNAÐARLIGA TRÝSTIÐ Á TAIVAN

Kina kann taka eina ella fleiri taivanskar oyggjar nær við meginlandið, um Kina vildi gjørt avmarkaða hernaðarliga atgerð ímóti Taivan. Kinmen og Matsu eru teir størstu oyggjabólkarnir nær við kinesiska meginlandið.




Tað er ikki sannlíkt, at Kina í løtuni hevur teir neyðugu førleikarnar til at kunna gera eina væl eydnaða innrás. Um Kina kortini velur at gera innrás í Taivan, t.d. um Taivan lýsir seg sjálvstøðugt, kann tað henda við sera stuttum skotbrá.

Kina kann eisini velja aðrar hernaðarmøguleikar t.d. avbyrging ella bumbing, sum skal trýsta Taivan til at geva seg yvir. Endiliga kann Kina velja minni umfatandi atgerðir sum t.d. at taka eina ella fleiri av teimum smærru Taivansku oyggjunum nær kinesiska meginlandinum. Tað kundi Kina gjørt sum eitt tekin um, at Taivan klárar ikki at verja sítt umveldi, og fyri at flyta markið fyri, hvat ið Kina fær gjørt, uttan at USA blandar seg uppí hernaðarliga.

Vandin fyri kinesiskum álopi á Taivan veldst ikki bara um fyrireikingar og ætlanir hjá Kina, men eisini um, hvat ið Taivan, USA og teirra sameindu gera. Vandin veksur, um USA og tess sameindu signalera, at tey fara ikki at blanda seg upp í eitt kríggj ella gera revsitiltøk. Í einari støðu har ið vesturheimurin er syndraður m.a. á handilspolitiska økinum, kann tað gerast torført at semjast um revsitiltøk ímóti Kina. Um Taivan lýsir seg sum sjálvstøðugt land, veksur vandin fyri kinesiskum álopi munandi.

Kríggj um Taivan fer at broyta trygdarpolitisk kor grundleggjandi í Danmark og Evropa sum heild. Tað er, tí at møguleikarnir hjá USA at vera partur av trygdini í Evropa fara at minka, serstakliga um USA velur at fara í kríggið at verja Taivan.

## KINA BYGGIR HERSTØÐIR Á RIVUM OG OYGGJUM, SUM ÓSEMJA ER UM Í SUÐURKINAHAVI

Kina vil hava víðkaðar hernaðarligar ræsur og styrkt víddarkrøv í Suðurkinahavi. Kortið vísir londini kring tey møguligu serbúskaparøkini (EEZ) í Suðurkinahavi og tær fýra størstu kinversku hernaðarstøðirnar har á leiðini.



Ein hernaðarlig ósemja um Taivan, sum hevur USA við, fer uttan iva at føra til alheims búskaparkreppu. Tað er vegna avgerandi leiklutin hjá Kina í alheimsbúskapi, og tí at Taivan er høvuðsframleiðari av framkomnum telduflísum. Hesar flísar verða m.a. brúktar til at byggja dátumiðstøðir til vitlíki og hernaðarliga útgerð í vesturheiminum.

### Kina nútímansger og víðkar sítt hervald

Kina hevur síðani túsundáraskiftið nútímansgjørt og vaksið um sín hernaðarførleika til tess at náa síni tráan at gerast avgerandi spælari í Asia og eitt alheimsstórveldi. Tað skal eisini gera Kina ført fyri at bjóða USA av og vinna kríggj um Taivan. Tann stóra hernaðarstyrkin hevur eisini sum endamál at ræða onnur lond, serstakliga USA, frá at blanda seg uppí.

Almenna kinesiska verjuíløgan er næststørsta verjufíggjarætlan í heiminum, bara tann í USA er størri. Tann veruliga verjufíggjarætlanin er ivaleyst nógv størri, tí at peningur av øðrum fíggjarætlanum enn tí til hernaðin verður brúktur til hernaðarútgerð. Hóast tann kinverska fíggjarætlanin bert samsvarar einum lítlum triðingi av tí amerikansku, fær Kina hvørt ár tríggjar ferðir so mong nýggj krígsskip og byggir fleiri nýmótans stríðsflogfør enn USA. Tað kostar vanliga minni hjá Kina at framleiða hernaðarútgerð, enn tað ger í USA.

Síðani túsundáraskiftið er bæði rakettmegin, flotin og loftvápnið vaksið. Kina hevur nú heimsins størsta flota, mátað eftir talinum á krígsskipum, tá ið stuðulsskip ikki verða roknað uppí. Kina dubbar seg serstakliga við skipum og missilum, sum gera landið ført fyri at fara í kríggj ímóti USA og teirra sameindu um yvirræði til havs og í luftini í vestara parti av Kyrrahavinum. Tað skal fáa USA at aftra seg við at fara upp í verju av Taivan ella forða amerikanskum deildum at koma fram.

Í vestara parti av Kyrrahavinum er hermegin hjá Kina longu umleið líka sterk sum tann hjá USA. Í kríggi um Taivan kann Kina tó vera í vanda fyri ikki bara at stríðast ímóti Taivan og USA, men eisini teimum sameindu hjá USA, serliga Japan, hvørs hervald er ímillum heimsins sterkastu.

Flotin og loftvápnið hjá Kina gerast alsamt størri, og teirra útgerð er sum heild nýggjari enn tann hjá Taivan, USA og Japan. Tað hevði verið sera torført hjá USA at bygt sína hernaðarstyrki líka skjótt sum Kina, m.a. tí at ein partur av tí eldru útgerðini, sum USA og teirra sameindu hava, fer at verða tikið úr brúki tey komandi árini. Tískil er tað sera trúligt, at styrkisjavnvágin tey næstu 10 árini framvegis fer at vera til fyrimun fyri Kina.

Kina sendir nøkur herskip til uppgávur aðrastaðni, t.d. sjórænaramál í Adenvíkini og venjingar langt frá kinesiska meginlandinum. Í februar og apríl í 2025 helt flotin hjá Kina t.d. venjingar tætt við Avstralia og Nýsæland. So hvørt sum hernaðarstyrkin hjá Kina veksur, fær teirra hervald størri leiklut alheimsliga.

### Kina hevur harðrenda atferð í Suðurkinahavi

Kina krevur stórar partar av Suðurkinahavi við teirri sokallaðu tíggjustrikulinjuni. Krøvini eru ikki sambært altjóða viðurkendum sjómørkum og umskarast m.a. við krøv hjá Filipsoyggjum og Vjetnam. Kina byggir skansar á rivum til havs til tess at røkka longur við sínum hervaldi og fyri at fremja síni krøv í økinum.

Kina brúkar harðrenda framferð til tess at forða Filipsoyggjum í at sigla, vinna út náttúrutilfeingi ella byggja herútbúnað í teimum økjum, ósemja er um. Her siglir Kina við vilja inn í filipinsk skip og brúkar vatnkanónir og fysiskar avbyrgingar við nót.

Atburðurin hjá Kina í Suðurkinahavi økir vandan fyri ólukkum og misskiljingum, sum kunnu føra til stríð. Stórt vápnað stríð fer at fáa fylgjur fyri heimsbúskapin. Tað er tí at stórur partur av heimshandlinum siglir gjøgnum farvatnið.

### Kina vil minka um ávirkan vestaneftir og vera ein valmøguleiki fram um USA

Kina vil hava ein høvuðsleiklut í Asia og leiðslustøðu í heiminum. Við tí í hyggju brúkar landið støðuna í løtuni, har ikki bara Kina, men eisini Russland og USA í stóran mun trýsta onnur lond við sínari politisku, búskaparligu og hernaðarligu styrki. Kina styrkir sostatt hesa tilgongd enn meira.

Kina arbeiðir miðvíst við at minka ávirkanina hjá vesturheiminum á altjóða politikk og at seta Kina upp sum ein valmøguleika fram um USA. Hetta ger Kina m.a. við at ávirka rótfestar altjóða stovnar sum ST. Kina roynir alla tíðina at fáa síni sjónarmið arbeidd inn í politikk og málbrúk hjá stovnunum, m.a. við altíð at lýsa mannarættindi sum nakað, sum ikki er alment galdandi, men tvørturímóti er ymiskt frá landi til land. Kina miðar eisini eftir at menna og seta dám á nýggjar altjóða stovnar, har ið Kina hevur leiðandi leiklut, sum t.d. Shanghai Cooperation Organization og BRIKS, sum er eitt samstarv millum Brasilia, Russland India, Kina og Suðurafrika umframt fleiri onnur lond uttan fyri vesturheimin.

Kina sær enn Russland sum sín týdningarmiklasta partnara í kappingini við USA. Tessvegna styrkir Kina samstarvið hóast atfinningar vestaneftir og revsitiltøk ímóti kinesiskum virkjum, sum bróta revsiátøk ímóti Russlandi. Samhandilin millum tey bæði londini er vaksin munandi, síðan Russland leyp á Ukraina.

Til tess at gera búskapin hjá sær harðførari og standa sterkari mótvegis vesturheiminum miðar Kina ímóti meira samstarvi og samhandli við lond uttan fyri vesturheimin í Asia, Afrika, Latínamerika og Osiania. Tað skal tryggja Kina aðrar valmøguleikar enn samstarv og samhandil við vesturheimin. Í 2024 var samhandilin hjá Kina við hesi lond vaksin til meira enn helvtina av samlaða út- og innflutninginum hjá Kina. Ein partur av hesum vøkstri er tó vegna broytt handilsmynstur, nú ið útflutningur frá Kina til vestanlond ofta fer umvegis onnur lond.

### Kina vil vera búskaparliga og tøkniliga óheft

Kina fyrireikar seg til møguligt stríð, serstakliga ímóti USA. Tí hevur trygdarpolitikkur tey seinnu árini fingið størri ávirkan á búskaparligar avgerðir hjá landinum. Kina roynir at gerast óheftari av vestanlondum, m.a. við at gera íløgur í sína egnu tøkniligu menning. Hóast landið hevur gjørt stór framstig, hava kinesisk virki og granskingarstovnar enn tørv á samstarvi við vesturlendskar partnarar.

Samstundis roynir Kina at gera onnur lond meira heft at sær, t.d. innan sjáldsom jarðsløg, battarítøkni og sólsellur. Tað ger Kina serliga fyri at økja sína ávirkan á onnur lond, men eisini fyri at tað skal vera torført hjá øðrum londum at áseta revsitiltøk ímóti Kina og enda samhandilin. At vera heft at kinesiskari tøkni kann gera tað torført hjá vestanlondum at uppbyggja sína hernaðarstyrki.

Tøkni er avgerandi fyri búskaparliga menning í Kina og verður raðfest sera ovarlaga í teirra menningarætlanum. Kina leggur dent á tøkni, sum er serliga týdningarmikil, eitt nú skamtatøkni, vitlíki og lívtøkni. Tað fer at geva Kina hernaðarligan fyrimun og vera avbjóðing fyri búskaparligu styrkina í vesturheiminum.

Fleiri av raðfestingunum hjá Kina innan fyri hesar serliga týdningarmiklu tøknigreinir kunnu fáa týdning, skuldi eitt stríð komið við vesturheimin. Tað er t.d. galdandi fyri vitlíki, sum t.d. kann brúkast til krígsatgerðir við dronum, og skamtatøkni, sum hevur møguleika at loysa núverandi krypteringshátt.

Kina brúkar nógva orku til at røkka sínum málum at gerast fremst í sínari raðfestu tøkni. Tað sæst eisini í landsins ætlanum á skipaðan hátt at flyta tøkni og vitan frá vestanlondum. Flutningurin hendir bæði á lógligan og ólógligan hátt í stóran mun. Hóast Kina er á odda á fleiri tøkniligum økjum, heldur landið kortini fram við at njósnast fyri at stjala tøkni frá londum sum Danmark.

Tað umfatandi arbeiði, Kina ger til tess at ogna sær vitan, er tann størsta hóttanin ímóti danskari gransking, nýskapan og tøkni.

## KINA BRÚKAR NÓGVA ORKU TIL AT FLYTA TØKNI ÚR VESTANLONDUM

Kina dregur nógvar ymiskar felagsskapir og einstaklingar uppí at skipa fyri og fremja tøkniflutning.

1 Floksmálgagn, statsligir felagsskapir, universitet og virki í Kina **avdúka tørv** á tøkniflutningi og menning á vísinda- og tøkniøkinum.

2 **Teir seta síðan virkandi í útlondum í gongd** at flyta tøkni og kunnleika til Kina. Tað kunnu vera kinesisk feløg, teldusníkar, felagsskapir fyri kinesarar í útlondum, íleggjarar og fregnartænastur.




3 Tey virkandi **skráseta handanhavs tilfeingi** á vísinda- og tøkniøkinum fyri at draga serkøn til sín og útvega keldur, gera íløgur í feløg og hótta KT-skipanir hjá virkjum.

4 Tey virkandi hjálpa serkønum og feløgum við at **stovna virki í Kina** ígjøgnum statsligar talentskráir, granskingaravtalur og samváðafeløg saman við kinesiskum feløgum. Teldusníkar og fregnartænastur stjala vitan og tøkni frá virkjum og granskingarstovnum í vestanlondum.

### SIVIL KINVERSK UNIVERSITET STUÐLA HERNAÐARDUBBINGINI HJÁ KINA

Hervaldið í Kina arbeiðir saman við sivilum universitetum til tess at menna tøkni til hernaðarnýtslu. Tað hendir sum partur í ætlanum hjá Kina at sameina hernaðarmál og sivilmál. Tað merkir, at granskingarsamstarv við Kina í summum førum stuðlar teirra hernaðartøkniligu menning.

Ein stórur partur av universitetunum í Kina hevur skyldu til at arbeiða saman við hervaldinum. Tað er til dømis galdandi fyri leiðandi kinesiskar granskingarstovnar sum Beijing Universitet, Tsinghua universitet og Chinese Academy of Sciences. Hesir og aðrir sivilir granskingarstovnar arbeiða saman við hernaðargranskingarstovnum um so ymisk evni sum pólgransking, vitlíki, skamtatøkni og skipasmíð.

### Kina er frammarlaga við fleiri sløgum av skamtatøkni

Skamtatøkni eru nýggj og framkomin tøknisløg, sum enn eru í menning og brúka grundreglurnar frá skamtaalisfrøði. Hesi tøknisløg fara í framtíðini møguliga at geva nýggjar møguleikar fyri tryggum samskifti, neyvum mátingum og serstøkum rokniuppgávum, sum krevja nógv meira enn vanligar teldur.

Skamtatøknisløgini kunnu brúkast bæði hernaðarliga og sivilt. Tøknisløgini fara at geva stórar fíggjarligar og hernaðarligar fyrimunir til teirra, sum hava ræði á teimum.

Menningin á skamtaøkinum er í dag sum ein kapprenning, har ið Kina er størsti kappingarneyti hjá USA og øðrum vestanlondum. Kina hevur sett sær stór mál við menning av skamtatøknisløgum og er í dag á odda í m.a. skamtasamskifti. Vestanlond hava nú varnast avbjóðingarnar viðvíkjandi trygd við at samstarva við Kina um skamtatøkni, og fleiri teirra eru farin at arbeiða við fyrivarni. Tey hava m.a. avmarkað atgongdina hjá Kina til akademiskt samstarv, innkeyp av avgerandi lutum og møguleikar at gera íløgur í tøknivirki vestanfyri.

Skamtatøkni kann bøta nógva núverandi hernaðar tøkni m.a. til at varnast kavbátar og finna leið, har ið GPS-signal eru avbyrgd. Skamtatøkni kann eisini verja ímóti loynilurting og geva trygt samskifti. Um hesi tøknisløg verða ment á skynsaman hátt, kunnu tey geva hernaðarstrategiskan fyrimun mótvegis mótparti, sum ikki hevur somu førleikar.

Kina arbeiðir við at menna skamtateldur, sum kunnu loysa verandi kryptering. Tað kann geva Kina atgongd til at lesa loyniligar dátur og samskifti, sum kann vera samskifti frá myndugleikum ella aðrar upplýsingar, sum krevja vernd. Tað er sannlíkt, at Kina longu nú savnar krypteraðar dátur úr øðrum londum við tí fyri eyga at loysa krypteringina seinni.

Ein onnur avbjóðing er, at Kina fer at kunna falsa talgildar undirskriftir. Tað fer at gera tað møguligt at bróta inn í tryggar skipanir og geva atgongd til viðkvæmar upplýsingar. Kina fer so at fáa samskift, sum um tað var ein danskur myndugleiki. Í veruleikanum verður tað ógjørligt at síggja mun á følskum og veruligum samskifti. Tað fer helst at vera ivi um allan

### HÓTTANIN FRÁ SKAMTATELDUM ÍMÓTI TRYGGUM SAMSKIFTI



heim viðvíkjandi talgildum samskifti, longu tá ið tað verður hildið, at ein skamtatelda finst, sum kann loysa kryptering.

Kina fer møguliga innan fyri tey næstu 10-15 árini at hava ment eina skamtateldu, sum kann loysa kryptering. Tað kann vera torført at siga, nær ið avgerandi loysnin kemur, tí at tøknin er samansett, og framstig verða ikki altíð almannakunngjørd.

### Kina njósnar og ávirkar fyri at styrkja sína egnu menning og fyrireika seg til stríð

Kina hevur sera umfatandi skrá fyri netnjósning til tess at fremja tøkniliga menning og at styrkja sína búskaparligu og politisku ávirkan. Í vestanlondum fremur Kina fyrst og fremst netnjósning ímóti politiskum stovnum og ímóti virkjum, sum arbeiða við tøkni og verju. Kina brúkar nósningina til at ogna sær upplýsingar um framkomna tøkni vestanfyri, verjuviðurskifti og um avgerandi undirstøðukervi.

Kina fremur njósning ímóti uttanríkisráðum, verju- og stjórnarstovnum fyri at fáa vitan, sum kann geva fyrimun í tess hernaðarligu menning og vitan um mótstøðupartsins hernaðarførleikar ella sendiharraviðurskifti við onnur lond. Tað kann t.d. merkja, at Kina fær betri innlit í hugburð hjá ymsum londum viðvíkjandi spurninginum um Taivan.

Kina brúkar fregnartænastur og feløg undir kommunistaflokkinum til at ávirka politikarar í øðrum londum íroknað Evropa og Danmark. Kinesiskar fregnartænastur seta ella útvega sær fólk tætt hjá máttmiklum politikarum, so at tey kunnu fylgja við í hernaðarligum kjaki og ávirka avgerðir tann veg, sum er jaligari fyri Kina og kommunistaflokkin. Kinesisk ávirkan skal forða fyri, at vesturheimurin stendur saman mótvegis Kina, og skal hjálpa Kina til at handfara ósemjur við vestanlond.

Kina nýtir eisini nógva orku til eftirlit og yvirvaking við kinesarum í útlondum fyri at forða fyri, at tey finnast at kommunistaflokkinum ella arbeiða ímóti kinesiskum áhugamálum. ■

#### KINVERSK NETNJÓSNING

Í 2025 almannakunngjørdi stjórnin í Kekkia, at and snikar frá kinesiska statssníkabólkinum, kendur sum APT31, høvdu framt eitt netálop ímóti kekkiska uttanríkisráðnum. Sníkabólkurin, sum arbeiðir fyri kinesisku fregnartænastuna MSS, hevði havt atgongd síðani 2022 og hevði tað tíðarskeiðið møguleika at heinta upplýsingar um uttanríkismál frá Kekkia og teimum londum, sum Kekkia samstarvar við. Hetta kann geva Kina ein fyrimun í sendiharraviðurskiftum við at geva teirra sendiharrum undanvitan í samráðingum og í møguligum ósemjum við Kekkia ella tess samstarvspartnarar.

#### NJÓSNARAR FYRI KINA

Í 2024 bleiv Jian Guo handtikin í Týsklandi. Hann var atstøðingur hjá Maximilian Krah úr flokkinum Alernative für Deutschland (AfD). Í september 2025 fekk Jian Guo ein fongsulsdóm í fýra ár og níggju mánaðir fyri at hava latið loyniligar upplýsingar frá samráðingum í Evropatinginum leka til eina kinesiska fregnartænastu og fyri at njósnast ímóti kinesiskum mótstøðufólki í Týsklandi. Í sambandi við hesa somu sak er ein kinversk kvinna dømd eitt ár og níggju mánaða treytaða fongsulsrevsing fyri at hava latið Jian Guo upplýsingar um vesturlendsk hernaðarflogfør, hermannalið og dronur.




# YVIRGANGUR, ÓTRYGD OG FÓLKAFLYTING

## STRÍÐ OG ÓSTØÐULEIKI Í MIÐEYSTRI OG AFRIKA GEVA FRAMVEGIS GRÓÐRARLÍKINDI FYRI YVIRGANGI OG ÓTAMDARI FÓLKAFERÐING

Yvirgangshóttanin fer framhaldandi at vera álvarsom í Evropa m.a. vegna áhaldandi ótryggleika og ósemjur í Miðeystri. Tey seinastu árini er talið av islamisktiskum yvirgangsálopum vaksið í Evropa, serstakliga tí at valdsbólkar misnýta stríðið í Gasa til at eggja hernaðarligum islamistum til at leypa á. Samstundis ger tann ótrygga støðan í Sýria at Islamskur Statur styrknar og gerst aftur ein álvarslig hóttan móti Evropa. Í Jemen hóttir Houthi-rørslan framhaldandi skipaferðsluna í Reyðahavinum, væl stuðlað av Iran. Sum ein part av stríðnum við Ísrael fremur Iran yvirgang móti ísraelum og jødum uttan fyri Ísrael.




Rannsóknarfólk úr tí fronsku løgregluni kanna brotsstað í februar 2025 eftir knívsálop, sum sera sannlíkt var ein islamistisk valdsgerð.
Sebastien Bozon/AFP/Ritzau Scanpix

Yvirgangshóttanin frá stríðsfúsari islamismu í Evropa er vaksin tey seinastu árini og fer framhaldandi at vera álvarslig. Ósemjur og ótrygd í Miðeystri fara enn at hava stóra ávirkan á hóttanina. Veikir og ótryggir statir í Miðeystri veita samstundis vápnaðum liðum møguleika at koma fyri seg og raka vestanmál har um vegir.

### Islamskur Statur eggjar ofta til yvirgangsálop í Evropa

Talið á gjøgnumførdum og forðaðum harðrendum islamistiskum yvirgangsálopum í Evropa hevur verið vaksandi tey seinastu árini og liggur enn høgt í 2025. Sannlíkt verður tað høgt við sama lag í 2026. Í 2025 hava tað serliga verið Týskland, Eysturríki og Frakland, sum hava verið fyri yvirgangi – álopum og fyrireiking.

Tey allarflestu álopini og royndirnar at leypa á verða framvegis framd av stríðsfúsum islamistum, sum virka einsamallir ella í smáum netverkum. Í flestu førum hava persónarnir sín íblástur frá harðrendari islamistiskari propagandu. Í 2024 var tað serstakliga ISKP, undirbólkur hjá Islamskum Stati í Afghanistan, sum royndi at stuðla viðhaldsfólki í Evropa í álopum. Bólkurin er tó viknaður í 2025 og er ikki longur sama hóttan ímóti Evropa.

### TALIÐ Á HARÐRENDUM ISLAMISTISKUM YVIRGANGSATSÓKNUM ER AFTUR HØGT Í EVROPA




Talið á gjøgnumførdum og forðaðum stríðsfúsum islamistiskum álopum í Vesturevropa er vaksið tey seinastu tvey árini.

Heimild: Nesser, P. (2024). Introducing the Jihadi Plots in Europe Dataset (JPED). Journal of Peace Research, 61(2)). Tølini fyri 2024 og 2025 eru frá FE og røkka fram til og við oktober 2025. FE hevur talt upp á sama hátt sum Nesser.

Stríðshugaðir islamistar royna oftast at raka støð, har ið nógv fólk eru savnað, sum t.d. marknaðir, festivalar og jarnbreytarstøðir. Í øðrum førum royna tey at raka symbolsk pláss eitt nú synagogur, kirkjur, trúarlig minnismerki og sendistovur.

Nógvir av teimum stríðshugaðu islamistunum, sum gera álop í Evropa, hava sína tilelving frá stríði í Miðeystri. Al-Qaida og Islamskur Statur eggja javnan muslimum um allan heim at hevna dráp í Gaza. Ósemjan fer við sama lag at geva íblástur hjá mongum stríðshugaðum islamistum.

Felags fyri næstan øll álop í Evropa er, at tey verða framd á einfaldan hátt, serstakliga við knívi og onkuntíð við bili. Talið á deyðum er av tí sama lítið til tað, samanborið við álop, sum verða gjørd við skotvápnum ella spreingievnum. Islamskur Statur eggjar í sínum rakstrarrópum javnan stríðshugaðum islamistum til at brúka einføld amboð til síni álop, m.a. tí at tað er torførari hjá evropiskum trygdartænastum at varnast og forða fyri einføldum álopum. Tað er eisini sum heild torført hjá stríðshugaðum islamistum at útvega sær vápn ella at framleiða spreingievni í flestu londum í Evropa.

Ein partur av frágreiðingini til tað vaksandi talið á álopum tey seinastu árini er, at talan er um einføld álop, sum eru skjót at fyrireika. Samstundis eggja álop ofta øðrum stríðshugaðum islamistum til at gera líknandi álop.

## METING AV YVIRGANGS-HÓTTANINI ÍMÓTI DANMARK

Í seinastu meting síni av yvirgangshóttanini ímóti Danmark skrivar CTA (Center for Terroranalyse), at yvirgangshóttanin ímóti Danmark er á stigi ÁLVARSLIG. Trygdarpolitiska støðan er tey seinastu árini versnað. Millum annað brúka ávísir statsligir partar háttaløg, sum kunnu javnmetast við yvirgang, og gera sítt til, at hóttanarmyndin verður meira sundurpettað og fløkt. Stríðið í Miðeystri eigur í sær stórar møguleikar fyri herbúgving, sum eisini komandi ár fer at økja yvirgangshóttanina. Men yvirgangsálop frá stríðshugaðum islamistum, høgravíðgongdum, vinstravíðgongdum og antimyndugleikavíðgongdum eru við sama lag størsta yvirgangshóttanin ímóti Danmark. Yvirgangshóttanin frá stríðshugaðum islamistum er enn á stigi ÁLVARSLIG, og tað mest sannlíka islamistiska yvirgangsálopið er eitt, sum verður framt av einstaklingi ella einum lítlum bólki.

CTA metir, at yvirgangshóttanin frá høgravíðgongdum enn er á stigi VANLIG.

**Ófriður í Miðeystri kann styrkja yvirgangsbólkar**
Fleiri lond í Miðeystri eru enn merkt av veikum stjórnum, innanhýsis valdsstríði og í summum førum vápnaðum ósemjum. Vantandi trygd ger tað møguligt hjá stríðshugaðum islamistiskum bólkum at breiða seg í hesum londum. Tað er serstakliga galdandi fyri Sýria, har ið trygdarstøðan enn er ridlut eitt ár eftir, at Asad-stjórnin fall.

Úrslitið av kríggi í nógv ár, fíggjarkreppu og spenningi millum fólksløg í Sýria ger tað torført at savna landið. Harafturat hava valdsgerðir, sum sýriskar trygdardeildir hava framt, økt misálitið á stjórnina.

Serstakliga gongdin í Landnyrðingssýria fer at hava týdning fyri trygdina í landinum. Tann nýggja stjórnin krevur, at tað kurdiska sjálvstýrið leggur vápnini og letur eftirlitið í økinum frá sær. Vandin fyri vápnaðari ósemju millum báðar partarnar er vorðin størri í 2025, av tí at samráðingar um framtíðina í økinum eru steðgaðar. Í tí sambandi fer USA at hava týdningarmiklan leiklut sum meklari ímillum báðar partarnar.

Islamskur Statur í Sýria fer sannlíkt at gagnnýta vápnað stríð millum kurdiska sjálvstýrið og sýrisku stjórnina til at endurvinna styrki. Bólkurin hevur í 2025 fingið nógv størri rásarúm. Tað er lutvíst vegna valdsskiftið í Sýria, sum hevur givið bólkinum møguleika at breiða seg, lutvíst tí at minni trýst er frá USA, sum áður hevur gjørt fleiri álop á bólkin.

Bólkurin fer eisini at gagnnýta vaksandi ótrygd til at leypa á legur og fongsul í kurdiskum øki til tess at fría nakrar av teimum upp ímóti 10.000 limunum í Islamskum Stati, sum sita fastir har. Um tað verður ein hópflótti av limum í Islamskum Stati úr hesum fongslum, fer tað at vaksa um yvirgangshóttanina ímóti Evropa. Nógvir av limunum í Islamskum Stati í Sýria bæði í og uttan fyri legurnar hava tilknýti til lond í Evropa, og tað er sannlíkt, at teir fara við sama lag at vilja gera ella stuðla yvirgangsatsóknir í sínum upprunalandi. Tað er eisini galdandi fyri kvinnur, sum eru bróðurparturin av teimum innsettu í legunum. Kvinnurnar hava í størri mun enn fyrr samband við víðgongd umhvørvi í Evropa og aðrastaðni.

Hin veiki sýriski staturin og tann nýggja styrkin hjá Islamskum Stati fara at økja ótrygdina í landinum. Tað økir samstundis vandan fyri, at nýggjar ósemjur koma upp, og sostatt at nýggir flóttafólkastreymar koma úr Sýria ímóti Evropa tey komandi árini.

Yvirgangshóttanin frá stríðsfúsari islamismu í Evropa er vaksin tey seinastu árini og fer framhaldandi at vera álvarslig. Ósemjur og ótrygd í Miðeystri fara enn at hava stóra ávirkan á hóttanina.

## SÝRIA ER FRAMVEGIS Í TVÍNINGUM, HÓAST STJÓRNIN HJÁ ASSAD FALL

Stórir partar av Sýria eru ikki undir eftirliti av fyribilsstjórnini. Tað gevur yvirgangsbólkum, serstakliga Islamskum Stati, høvi at breiða seg í landinum og gerast vaksandi hóttan ímóti Evropa í framtíðini.



## SAMMAD DRONUR, ONKAVÁPNIÐ HJÁ HOUTHI-RØRSLUNI

Houthi-rørslan brúkar dronur í nógvum av sínum vápnaða virksemi. Millum teirra mest nýtiligu dronur er Sammad, sum er grundað á eitt iranskt snið, sum Houthi-rørslan hevur brúkt síðani 2018. Onnur, sum brúka Sammad, eru Hizbollah í Libanon og vápnaðir bólkar í Irak, sum halda við Iran. Sammad dronurnar eru einfaldar, men samstundis lagaligar, lættar at framleiða og rættiliga bíligar, tær kosta uml. 50.000 USD hvør.




**Samlisett við einføldum og framkomnum pørtum**

1. Dronubulurin og veingirnir av glastrevjum verða framleiddir á staðnum.
2. Elektronikkurin, fínmekanikkurin og følarar í dronuni verða oftast latnir frá Iran ella frá privatum virkjum t.d. í Kina.
3. Dronan hevur ein lítlan propellmotor, t.d. av sama slag sum teir, ið verða brúktir til frítíðarbrúk í modellflúgvarum. Sovorðnir motorar kunnu keypast á netinum fyri 1-2.000 USD.

Dronan verður sett saman á staðnum.

Sammad dronan er uml. 3 m long, og veingjavíddin er 4-5 m. Hon kann føra uml. 20 kilo av spreingievni. Tað er nóg mikið til at gera stóran skaða á t.d. ein íbúðarbygning. Summi sløg av dronuni røkka upp ímóti 2.000 km. Við teimum fær Houthi-rørslan lopið á mál í Ísrael úr Jemen. Hvør einstøk Sammad drona er ikki torfør at verja seg ímóti við nýmótans loftverjuskipanum. Men Houthi-rørslan hevur nógvar dronur, sum tað er bæði torført og dýrt at verja seg ímóti. Bara eitt loftverjumissil kann kosta upp til 2-3 mió. USD.

**Framkomin hernaðartøkni økir hóttanina frá vápnaðum deildum og uppreistrarbólkum**

Alsamt fleiri uppreistrarbólkar og varnarlið í Miðeystri og Afrika, íroknað Houthi-rørslan í Jemen, ein røð av Iran-sinnaðum varnarliðum í Irak, Hizbollah í Libanon og Rapid Support Forces í Sudan, eiga nú langtberandi dronur og missil. Um teir skuldu ætlað tað, kunnu hesir bólkar við tílíkum vápnum hótta síni mótstøðufólk við álopum fjart frá teimum økjum, sum teir sjálvir ráða yvir.

Drívmegin hjá uppreistrarbólkum og varnarliðum í Miðeystri kemur ofta frá mótstøðu og illvilja ímóti veturlendskum virðum og tí, sum bólkarnir uppfata sum vesturlendskt politiskt, búskaparligt ella hernaðarligt yvirræði. Kríggið í Gaza og atburðurin hjá Ísrael á tí hersetta Vestara áarbakka elvir, saman við stuðlinum hjá USA til Ísrael, til enn meira mótstøðu og illvilja.

Tað er sum heild vorðið bíligari og lættari at útvega lutir til at framleiða hernaðarútgerð. Tað ger, at fleiri bólkar hava møguleika at útvega og sjálvi menna og framleiða framkomin vápn, sum bara lond og teirra hernaðardeildir áður høvdu atgongd til.

Framkomin hernaðartøkni kann brúkast hjá uppreistrarbólkum og varnarliðum til at tálma og ræða kappingarneytar og landsins deildir. Bólkarnir kunnu hótta ferðslu, flutning og orkuveiting sum t.d. altjóða floghavnir og oljureinsiverk. Tískil kunnu uppreistrarbólkar og varnarlið leggja trýst á sjálvt sterka mótstøðu til at broyta politiska, diplomatiska ella búskaparliga kós.

Houthi-rørslan í Jemen, sum fær stuðul úr Iran, er framhaldandi ein hóttan ímóti einari av týdningarmiklastu sjóhandilsleiðunum millum Evropa og Asia. Bólkurin hevur lopið á skip í Reyðahavinum og Adenvíkini síðani endan av 2023 sum svar upp á stríðið millum Ísrael og Hamas. Úrslitið hevur verið munandi minking í handilsskipaferðsluni gjøgnum Reyðahavið. Houthi-rørslan hevur eisini gjørt álop á Ísrael við dronum og missilum, og bæði Ísrael og USA hava hevnt álopini.

Álopini hjá Houthi-rørsluni hava ivaleyst fingið teirra mótstøðufólk á leiðini, serliga Saudi-Arabia og Sameindu Arabisku Emiratini, at aftra seg. Hesi bæði londini eru fíggjarligir høvuðsstuðlar hjá politiskum og hernaðarligum mótstøðufólkum hjá Houthi-rørsluni í Jemen og hava tey seinastu árini sent egnar hernaðardeildir inn ímóti hesi rørslu. Kortini gjørdi hvørki teirra sær dælt av ógvisligu álopunum hjá USA í Jemen á vári 2025 til sjálvi at seta í verk ella stuðla hernaðarálop ímóti rørsluni. Umframt tað hava londini á Arabiahálvoynni sett seg ímóti, at USA nýtir sínar herstøðir á leiðini til álop ímóti Houthi-rørsluni og tess fíggjarliga høvuðsstuðli Iran. Tað kemst av, at tey arabisku londini vilja standa uttanveltað í stríðnum hjá USA bæði við Iran og houthiarar.

Teir fyrimunir, ið Houthi-rørslan hevur fingið av sínum álopum á Ísrael og skipaferðsluna kring Jemen, kunnu geva íblástur til onnur varnarlið at dubba seg samsvarandi. Um tað hendir, kann ein økt útbreiðsla av langtrøkkandi, framkomnum vápnum hava við sær hóttanir móti nógv størri landaøkjum samanborið við tær hóttanir, sum higartil hava verið avmarkaðar kring lokal stríðsøkir.

Tað er sum heild vorðið bíligari og lættari at útvega lutir til at framleiða hernaðarútgerð. Tað ger, at fleiri bólkar hava møguleika at útvega og sjálvi menna og framleiða framkomin vápn, sum bara lond og teirra hernaðardeildir áður høvdu atgongd til.

### Iran brúkar statsyvirgang ímóti Ísrael og atfinningarsomum røddum í Evropa

Iran hevur síðani kollveltingina í Iran 1979 brúkt sínar fregnartænastur til at fremja statsyvirgang við at hótta og leypa á iranskar mótstøðubólkar, miðlar og einstaklingar, sum finnast at iranska stýrinum. Tey seinastu árini hava iranskar fregnartænastur tó eisini verið uppi í álopsætlanum ímóti ísraelskum og jødiskum málum fleiristaðni í Evropa og Norðurlondum. Tað er fyrst og fremst av støðuni í Gaza og stríðnum millum Ísrael og Iran og teirra partnarar har um vegir.

Iran sær seg sjálvt meira og meira í einum áhaldandi verjustríði ímóti Ísrael og iranskum atfinnandi røddum í Evropa, sum eftir metingini hjá stýrinum eru ein hóttan ímóti einaræðisstýrinum. Iran metir tað sostatt at vera heilt lógligt at leypa á iranskar atfinnarar og ísraelsk mál um allan heim, íroknað Evropa.

Iranska stýrið og tess fregnartænastur royna tó at leggja sjógv millum seg og álopini við at nýta varafólk, sum tey finna í Evropa og egnum grannalondunum. Varafólkini hjá Iran kunnu vera einstaklingar ella limir í brotsmannaliðum, sum kanska ikki vita, at tey arbeiða fyri Iran.

### Harðrend islamisma vinnur frama í pørtum av Afrika

Islamskur Statur og Al-Qaida fara at halda fram at breiða seg út yvir veikar statir í Afrika. Ov stórur fólkavøkstur, arbeiðsloysi, fátækdømi umframt politiskur og fíggjarligur ójavni eru umráðandi grundir til, at harðrend islamisma breiðir seg so skjótt serstakliga í Vesturafrika. Tað er ikki minst galdandi í Mali, Burkina Faso, Niger og Norðurnigeria. Tann skroypiliga støðan í fleiri av londunum hevur verið ein høvuðsorsøk til útbreiðsluna av harðrendari islamismu í Vesturafrika. Tílík viðurskifti hava elvt til, at Islamskur Statur og Al-Qaida hava eisini fest røtur á Horninum í Afrika. Her ræður al-Shabaab, sum er partur av Al-Qaida, yvir stórum pørtum av Somalia og er somuleiðis statt í Kenja og Etiopia.

Islamskur Statur og Al-Qaida er við sama lag ein hóttan ímóti vesturlendskum málum í Afrika, sum t.d. sendistovum. Serliga er hóttanin um at ræna vesturlendskar statsborgarar vaksin tey seinastu árini. Loysigjald er týdningarmikil inntøka hjá báðum bólkum. Ofta arbeiða teir báðir bólkarnir saman við øðrum bólkum á staðnum, sum fremja sjálva ræningina av

## IRAN BRÚKAR VARAFÓLK TIL AT FREMJA YVIRGANGSÁLOP ÍMÓTI ATFINNARUM OG ÍSRAELSKUM MÁLUM Í EVROPA

Iran roynir at sleppa undan at vera beinleiðis tongt at yvirgangsálopum í Evropa. Tessvegna fær Iran einstaklingar ella brotsmannalið at fremja álopini. Niðanfyri er eitt dømi um, hvussu tað kann ganga fyri seg.



einum vesturlendingi og selja viðkomandi víðari til Al-Qaida ella Islamskan Stat. Tað eru tó oftast trygdardeildir á staðnum og sivilfólk, sum Al-Qaida og Islamskur Statur fara eftir.

Islamskur Statur hevur fleiristaðni í Afrika klárað at drigið fremmandar krígsmenn til sín, serliga frá øðrum londum í Afrika, men eisini úr Evropa. Stríðshugaðir islamistar úr Evropa, sum eru farnir upp í yvirgangslið í Afrika, gagnnýta ofta síni netverk til at seta seg í samband við aðrar harðrendar islamistar í Evropa. Ofta ber tað tó ikki til hjá krígshugaðum islamistum úr Evropa at gerast partur av bólki í Afrika. Í slíkum føri verða tey oftast biðin um at verða verandi heima og gera álop í tí landi, tey búgva í, ella stuðla á annan hátt, t.d. við pengaflytingum. ■

## FLÓTTAFÓLK ÚR AFRIKA LEITA SÆR TIL EVROPA

Tað fara enn at vera flóttafólk, sum leita sær úr Afrika til Evropa. Talið á tilflytarum, sum eru komnir úr Afrika til Evropa uttan loyvi, er tó minkað tey seinastu árini. Tað er vegna nýggj tiltøk hjá ES, sum m.a. umfata avtalur við fleiri lond í Norðurafrika og Vesturafrika við denti á at steðga hesi tilflyting.

Hóast talið á flóttafólkum uttan loyvi er minkað tey seinastu árini, eru orsøkirnar, sum liggja aftan fyri flóttafólkastreymin úr Afrika til Evropa, enn tær somu. Fátækdømi, arbeiðsloysi, politisk kúging, ósemjur og stórur fólkavøkstur fer við sama lag at lokka fólk úr Afrika til at rýma ímóti Evropa. Tað er ikki minst galdandi fyri øki, sum eru merkt av stríði í Vesturafrika, har ið harðrendir islamistiskir bólkar hava tikið ræði á stórum økjum. Fleiri lond her á leiðini hava eisini avbyrgt seg frá vesturheiminum, og tað hevur fingið teirra vánaligu støðu at versna enn meira. Tað eru ikki vánir um, at henda gongd fer at broytast tey næstu mongu árini.

## HÓTTANIN FRÁ HØGRAVÍÐGONGDUM ER VORÐIN FLØKTARI

Hóttanin frá høgravíðgongdum persónum í Evropa er í broyting. Tey víðgongdu gera netverk bæði á internetinum og gjøgnum persónlig sambond. Serstakliga tað høgravíðgongda netverkið Active Club hevur breitt seg út um allan vesturheimin í lívd av at umboða lógligar felagsskapir við denti á venjing og tjóðskaparkenslu.

Yvirgangshóttanin frá høgravíðgongdum stavar ofta frá einstaklingum, sum hava fingið íblástur frá víðgongdum boðskapum og álopsfilmsbrotum til at fyrireika og fremja yvirgangsálop. Boðskapurin vendir sær til alsamt yngri fólk. Tað økir vandan fyri, at eldri høgravíðgongd radikalisera tey ungu og misnýta tey til at fremja sína egnu søk.

Tað er samstundis sannlíkt, at ókendir partar, sum hava samband við russiska statin, stuðla fysiskum og talgildum høgravíðgongdum bólkum og eggja teimum til óhóvsaman harðskap. Serstakliga høgravíðgongd á talgildum pøllum kunnu ávirkast og gerast før fyri at fremja yvirgang í Evropa. Russland stuðlar uttan iva eisini enn víðgongdar rørslur á politisku vongunum í Evropa við tí fyri eyga at skapa ótrygd í londum í Evropa.

Høgravíðgongd kunnu gera sær dælt av politiskari órógv, sosialari syndring og stríði í samfelagnum til tess at savna høgravíðgongdar rørslur við at bera rangar upplýsingar. Samstundis eggja tey til harðskap og yvirgang ímóti ymiskum etniskum ella trúarligum minnilutum. Eitt dømi var ófriðurin í Onglandi og Norðurírlandi í 2024 og 2025, tá ið ein stór herferð ímóti innflytarum elvdi til umfatandi ófrið, eldsáseting í tilflytaraherbergi og álop á løgregluna.

## ALLÝSINGAR

Til tess at gera tað lættari at lesa **ÚTSÝNI** kemur her ein stutt lýsing av teimum serstøku orðingum, sum FE nýtir í sínum fregnargreiningum.

**Hvussu eftirfarandi eru metingarnar**
Tað er ikki ofta, at ein fregnartænasta kann veita eina meting, sum ikki hevur óvissar partar í sær. Tí royna greinarar at gera lesarunum greitt, hvussu eftirfarandi teir halda, metingarnar eru. Tað gera teir við orðingum, sum fylgja sama mynstri, tá ið teir vilja úttrykkja sama trygdarstig.

FE brúkar tískil fimm fastar orðingar um trygdarstig: Eitt sannlíkindisstig er ein meting, ikki hagfrøðiliga útroknað sannlíkindi. Metingin veldst um, hvussu gott fregnargrundarlagið er, og hvussu samansett evnið er.

Sannlíkindi í stigum:




**Ávaringarstig**

| | |
|---|---|
| **Fáir mánaðir:** | Fyrsta dagin |
| **0-2 ár:** | næstu framtíð |
| **2-5 ár:** | Í framtíðini |
| **5-10 ár:** | Fjarari framtíð |
| **Yvir 10 ár:** | Sera fjarari framtíð |



Fylgisveinamynd av oyðileggingum nærindis Toropets í Russlandi eftir eitt dronuálop á eina vápnagoymslu í september 2024.
Afp Photo/AFP/Ritzau Scanpix

FE

Forsvarets Efterretningstjeneste
Kastellet 30
2100 København Ø

Telefon: 3332 5566
www.fe-ddis.dk